ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

29. februar 2012
Mál:11/00634-94

**Løgtingsmál nr. 169/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
(endurskoðan av barnaverndarlógini)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 2, stk. 1 verður aftaná "børn" sett: "og ung", og "18." verður broytt til: "23.".

**2)** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2*. Fyri ung í aldrinum 18 – 23 ár kunnu bert tær fyriskipanir, ið eru nevndar í § 15 b, setast í verk. Hesar fyriskipanir kunnu bert setast í verk, um ein fyriskipan er sett í verk eftir hesi lóg, áðrenn tann ungi fyllir 18 ár.".

**3)** § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Kommunurnar skulu seta barnaverndarnevndir. Kommunurnar skulu samstarva við aðrar kommunur um val av barnaverndarnevndum sbrt. stk. 5. Barnaverndarnevndirnar verða valdar av kommunustýrunum ."

**4)** Í § 4, stk. 2, verður aftaná 1. pkt. sett: "Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdarráð og hava reina revsiváttan."

**5)** § 4, stk. 5 verður orðað soleiðis: "*Stk. 5*. Samstarvsøkini sambært stk. 1 skulu skipast samsvarandi eindunum í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur. Samstarvsøkir kunnu samstarva um felags barnaverndarnevnd, og skulu

samstarvsøkini tá vera samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga."

**6)** § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Kommunustýrið skal syrgja fyri, at starvsfólk, við í minsta lagi miðallangari viðkomandi útbúgving, verða sett at umsita barnaverndarmál. Harumframt skulu starvsfólkini hava reina revsiváttan."

**7)** § 5, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4*. Barnaverndarumsitingin skal hava fastar, væl lýstar upp- og afturlatingartíðir, og tað skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarumsitingini umvegis telefon innan fyri hesar tíðir. Um tørvur er á hjálp uttan fyri arbeiðstíð, skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarnevndarformanninum ella einum, sum hann hevur latið hesa uppgávu."

**8)** Í § 8 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 2*. Barnaverndartænastan skal veita barninum tryggleika á tann hátt, at barnið kann venda sær til barnaverndartænastuna við sínum trupulleikum, uttan at hetta verður fráboðað foreldrum ella verja."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

**9)** Í § 9, stk. 1 verður "§ 15, stk. 4" broytt til: "§ 15 a".

**10)** Í § 11, stk. 2 verður "§ 15, stk. 4" broytt til: "§ 15 a og fyriskipan eftir § 15 b, stk. 3."

**11)** § 13, stk. 2, nr. 5 verður strikað.

**12)** Í § 14, stk. 1, 1. pkt. verður aftaná "viðurskifti," sett: "ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru,".

**13)** § 14, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum.".

**14)** § 14, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3*. Fráboðast skal eisini eftir stk. 1 og 2 um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.".

**15)** Í § 14 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5*. Eru ikki serlig viðurskifti, ið forða fyri tí, skal Barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um."

**16)** Í § 15, stk. 1, nr. 4 verður ", námsfrøðiligum og fíggjarligum" og "men tá ið fíggjarligt fríplássikki kann veitast," strikað.

**17)** § 15, stk. 1, nr. 11 verður orðað soleiðis:
"11) veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella egnari íbúð.".

**18)** § 15, stk. 4 verður strikað.

**19)** Aftaná § 15 verður sett:
"**§ 15 a**. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva familju til familjuviðgerð á stovni hjá landinum sum dag- ella samdøgurstilboð.
*Stk. 2*. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva barn, ið er fevnt av hesi lóg, og sum ikki kann integrerast á kommunalum dagstovni, á dagstovn hjá landinum.
*Stk. 3*. Barnaverndarnevndin kann veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið standast av fyriskipan eftir stk. 1 og 2, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. Um familjan verður innskrivað til familjuviðgerð eftir stk. 1, fáa foreldrini endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tó í mesta lagi við eini upphædd samsvarandi við hægstu sjúkradagpeningaveiting.

*Fyriskipanir til ung í aldrinum 18 – 23 ár*

**§ 15 b**. Barnaverndarnevndin kann avgera, at ein fyribyrgjandi fyriskipan skal halda fram eftir, at tann ungi hevur fylt 18 ár, ella seta aðra fyriskipan í verk eftir § 15, stk. 1, nr. 1, 5, 6, 9, 10 og 11.
*Stk. 2*. Er tann ungi umsorganaryvirtikin eftir § 19, tá viðkomandi fyllir 18 ár, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at:
1) fyriskipanin skal halda fram,
2) seta í verk uppihald í stovnslíknandi fyriskipan, og
3) seta í verk útslúsing frá uppihaldsstaðnum,

*Stk. 3*. Ein ella fleiri av fyriskipanunum í stk. 1 og 2 skulu setast í verk, tá tann ungi fyllir 18 ár, um tað verður mett at vera av munandi týdningi fyri, at tann ungi kann megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Fyriskipanin kann tó bert setast í verk, um tann ungi samtykkir.
*Stk. 4*. Fyriskipanir eftir stk. 1 og 2 skulu halda uppat, tá endamálið er rokkið, ella fyriskipanin ikki longur tænir endamálinum, og í seinasta lagi tá tann ungi fyllir 23 ár. Fyriskipan eftir stk. 2, nr. 1 skal tó halda uppat í seinasta lagi, tá tann ungi fyllir 21 ár."

**20)** § 16, stk. 2, 3 og 4 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Barnaverndarnevndin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at ein fyriskipan er sett í verk, meta um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan, ella um neyðugt er at seta nýggjar fyriskipanir í verk, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Barnaverndarnevndin skal eftir hetta meta um fyriskipanirnar minst 6. hvønn mánað.
*Stk. 3*. Er barnið sett heiman, skal eftirlitið eftir stk. 1 umfata minst tvær árligar eftirlitisvitjanir, har barnaverndartænastan tosar við barnið, helst í einrúmi. Metingin eftir stk. 1 skal grundast á eftirlitisvitjanirnar.
*Stk. 4*. Barnaverndarnevndin skal taka stig til, at nýggjar fyriskipanir verða settar í verk, og ætlanin eftir § 47 broytt, um metingin eftir stk. 1 vísir, at tørvur er á hesum."

**21)** Aftaná § 16 verður sett:

"**§ 16 a**. Barnaverndarnevndin kann seta heimið undir umsjón við at seta eftirlitsverja í heimið.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um heimildir og skyldur hjá eftirlitsverjum."

**22)** Í § 17, stk. 1 verður "munandi" strikað.

**23)** Í § 17, stk. 5 verður "tríggjar" broytt til: "fýra".

**24)** Í § 19 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4*. Í sambandi við umsorganaryvirtøku skal barnaverndartænastan hjálpa barninum at finna ein persón, ið kann tilnevnast sum fastur persónur, ið barnið altíð kann venda sær til við sínum trupulleikum, meðan barnið er sett heiman."

**25)** Í § 20, stk. 1 verður "flytast/" strikað.

**26)** Í § 22, stk. 1 og 3 verður "myndugleikalógini" broytt til: "foreldramyndugleikalógini".

**27)** Í § 23, stk. 1, nr. 1 verður "eitt nú vegna rúsevnismisnýtslu ella sálarlig brek," strikað.

**28)** Í § 23, stk. 1, nr. 2 verður "." broytt til: ",".

**29)** Í § 23, stk. 1 verður sum nr. 3 sett:
"3) barnið hevur verið til fosturs í minst 5 ár, og hevur fingið so sterkt tilknýti til fosturforeldrini, at tað má metast at vera av stórum týdningi og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum."

**30)** Yvirskriftin yvir § 24 verður orðað soleiðis:
*"Avgerð um umsorganaryvirtøku verður broytt, sett úr gildi ella endar"*

**31)** § 24 verður orðað soleiðis:
"**§ 24**. Viðvíkjandi fyriskipanum um umsorganaryvirtøku sambært § 19 skal barnaverndarnevndin við jøvnum millumbilum meta um, hvørt umstøðurnar hjá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, eru broyttar soleiðis, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, ella um støðan framvegis er soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið. Barnaverndarnevndin leggur eftirmetingina fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8.
*Stk. 2*. Metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at umstøðurnar eru broyttar, soleiðis at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, skal Høvuðsbarnaverndarnevndin seta avgerðina um umsorganaryvirtøku sambært § 19 úr gildi.
*Stk. 3*. Metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at støðan framvegis er soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um, at fyriskipanin skal halda áfram."

**32)** Aftaná § 24 verður sum §§ 24 a - 24 g sett:
"**§ 24 a.** Hevur eitt barn ikki verið sett heiman innan fyri tað seinasta árið, kann ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku ikki halda fram longur enn eitt ár frá tí degi,

Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð um fyriskipanina uttan við nýggjari avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.
*Stk. 2*. Hevur eitt barn verið sett heiman innan fyri tað seinasta árið, kann ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku ikki halda fram longur enn tvey ár frá tí degi, Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð um fyriskipanina uttan við nýggjari avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.
*Stk. 3*. Freistin í stk. 1 og 2 verður roknað frá tí degi, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð.
*Stk. 4*. Hóast ásetingina í stk. 1 og 2, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin áseta styttri freist fyri, nær eftirmeting skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.
*Stk. 5*. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann áseta eina longri freist enn tær í stk. 1 og 2, um umstøðurnar, ið eru grundarlagið fyri avgerðini, eftir øllum líkindum mugu væntast at vera til staðar út yvir freistina.

**§ 24 b.** Tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, kunnu krevja, at eitt mál um yvirtøku av umsorganini fyri einum barni sambært § 19, ella um varandi yvirtøku av umsorganini fyri einum barni sambært § 23, skal viðgerast av Høvuðsbarnaverndarnevndini av nýggjum, um umstøður teirra eru munandi broyttar.
*Stk. 2.*Barnaverndarnevndin leggur málið av nýggjum fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8.
*Stk. 3*. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó nokta fyri, at málið verður viðgjørt av nýggjum, um málið teir seinastu 12 mánaðirnar hevur verið viðgjørt av hesi nevnd.

**§ 24 c.** Í sambandi við nýggja avgerð um umsorganaryvirtøku skal málið um samverurætt sambært § 22 eisini verða endurskoðað.
*Stk. 2*. Áðrenn nýggja avgerð viðvíkjandi umsorganaryvirtøku skulu fosturforeldrini verða hoyrd.

**§ 24 d.** Eitt barn, ið er umsorganaryvirtikið sambært § 19, kann ikki setast heim aftur uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.
*Stk. 2*. Í sambandi við eina avgerð um at barnið skal setast heim aftur, ásetur Høvuðsbarnaverndin eitt tíðarskeið at fyrireika heimsetanina sbrt. § 24 f.
*Stk. 3*. Er barnið sett heiman við samtykki, og verður samtykkið afturtikið, skal barnaverndarnevndin leggja tilmælið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan í seinasta lagi 14 dagar eftir, at samtykkið er afturtikið, um barnaverndarnevndin ikki kann taka avgerð eftir § 20.

**§ 24 e.** Barnið kann ikki setast heim aftur, um mett verður, at tað eftir eini heildarmeting kann verða atvoldin til álvarsamar trupulleikar fyri barnið, um tað verður flutt.

**§ 24 f**. Høvuðsbarnaverndarnevndin skal áseta eitt tíðarskeið at fyrireika

heimsetanina. Longdin á tíðarskeiðinum kann vara upp til 6 mánaðir. Í serligum førum kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at einki tíðarskeið skal ásetast at fyrireika heimsetanina. Longdin á tíðarskeiðinum verður ásett við atliti at:
1) møguleikanum at tryggja eina varliga og tilrættarlagda heimsetan fyri barnið,
2) fyrireikan av møguligum fyriskipanum til barnið ella foreldrini, eftir at barnið er komið heim aftur,
3) møguleikanum hjá barnaverndartænastuni fyri at meta um, hvørt tað er grundarlag fyri at taka avgerð um umsorganaryvirtøku, tá foreldrini hava afturkallað samtykkið.

*Stk. 2*. Tíðarskeiðið, ið verður ásett at fyrireika heimsetanina, er framhald av tí fyriskipan, ið er í løtuni eftir § 19.

**§ 24 g**. Ein fyriskipan skal halda uppat, tá endamálið er rokkið, hon ikki longur tænir endamálinum, ella tá barnið fyllir 18 ár, sbrt. tó § 15 b."

**33)** Í § 27, stk. 5 verður 2. pkt. orðað soleiðis:
"Hóast ásetingina í stk. 2 kunnu hesi veljast, um tey kunnu góðkennast sum ítøkiliga egnað í mun til tað ávísa barnið.".

**34)** Í § 27, stk. 6 verður sum 1. pkt. sett: "Fosturforeldur skulu luttaka á einum skeiði um at vera fosturforeldur."

**35)** Í § 29, stk. 2 verður "Fosturforeldraskipanin" broytt til: "Avvarðandi barnaverndartænasta" og aftaná "samsýning" verður sett: "sbrt. stk. 1".

**36)** Í § 29, stk. 3 verður "Fosturforeldraskipanin" broytt til: "avvarðandi barnaverndartænasta".

**37)** § 33, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar fyri familjur, ið eru fevndar av hesi lóg." .

**38)** Í § 33, stk. 4 verður í 1. pkt. "stk. 1 og stk. 2" broytt til: "stk. 1 – 3", og í 2. pkt. verður aftaná "børnum" sett: "og familjum".

**39)** § 35 verður orðað soleiðis:

"**§ 35**. Eitt barn verður innskrivað á samdøgursstovn við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Høvuðsbarnaverndarnevndin ansar eftir, at barnið verður sett á rættan samdøgursstovn.

*Stk. 2*. Um einki nøktandi pláss er á samdøgursstovni í Føroyum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal setast á stovn uttanlands.

*Stk. 3*. Barnið kann ikki útskrivast uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, sbrt. § 24, stk. 2 og § 24 d."

**40)** Í § 37 verður sum nýtt stk. 1 sett:

"Um tað verður mett neyðugt fyri at kunna gera av, um tað er eyðsýndur vandi fyri álvarsomum skaða á

barnsins heilsu ella menning, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at barnið skal setast á stovn ella leggjast inn á sjúkrahús, her í millum á psykiatriska deild til eygleiðingar og kanningar uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum. Ein slík kanning skal vera liðug innan 2 mánaðir eftir avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini."
Stk. 1 og 2 verða eftir hetta stk. 2 og 3.

**41)** Í § 45, stk. 1 verður sum 2. pkt. sett:

"Kanningin skal taka støði í eini heildarmeting og skal fevna um barnsins:

1) menning og atferð,

2) familjuviðurskifti,

3) skúlaviðurskifti,

4) heilsuviðurskifti,

5) frítíðarviðurskifti og vinskap, og

6) onnur viðkomandi viðurskifti."

**42)** Í § 45 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2*. Í kanningini skal barnaverndarumsitingin lýsa styrkir og trupulleikar hjá barninum, familjuni og netverkinum rundan um barnið. Hevur barnið fylt 16 ár, skal kanningin harumframt lýsa tey serligu viðurskifti, ið atlit skal takast til, í sambandi við val av fyriskipan til hendan aldursbólk, sbr. §§ 15, 15 b og 19."

Stk. 2 – 9 verða hereftir stk. 3 – 10.

**43)** Í § 45, stk. 3, sum verður stk. 4, verður "stk. 2" broytt til: "stk. 3".

**44)** § 47, stk. 2 og 3 verða orðað soleiðis:

"*Stk. 2*. Ætlanin skal áseta endamálið við fyriskipanini, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at náa endamálinum. Ætlanin skal taka støði í kanningini eftir § 45. Ætlanin skal, í mun til tey viðurskifti, sum eru lýst í kanningini, seta ítøkilig mál í mun til barnsins trivna og menning í samsvari við yvirskipaða endamálið við fyriskipanini. Harafturat skal í ætlanini verða ásett, hvussu leingi fyriskipanin væntast at vara.

*Stk. 3*. Í málum, har barn verður sett heiman, skal ætlanin harumframt áseta, hvør fyriskipan skal setast í verk fyri familjuna, meðan barnið er sett heiman og í tíðini eftir, at barnið er komið heim aftur."

**45)** Í § 47, verða sum stk. 4, 5 og 6 sett:

"*Stk. 4*. Er talan um barn, ið hevur fylt 16 ár, skal ætlanin áseta ítøkilig mál fyri barnsins skifti til eina vaksnamannatilveru.

*Stk. 5*. Ein felags ætlan kann gerast fyri fleiri børn í familjuni. Ætlanin skal tó taka atlit til viðurskiftini hjá tí einstaka barninum.

*Stk. 6*. Í málum, har atliti til barnið ger, at avgerð um at seta fyriskipan í verk ikki kann bíða eftir, at ein ætlan er gjørd, er nóg mikið við eini stuttari tilskilan av endamálinum við fyriskipanini. Ein ætlan, ið lýkur krøvini í stk. 2-5, skal tó gerast skjótast gjørligt og í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at avgerð um at seta fyriskipan í verk er tikin."

**46)** Í § 55 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 2*. Tá eftirmeting skal gerast sambært § 20 og § 24, tó ikki § 24 d, stk. 3, og av bráðfeingisavgerð eftir § 17, skal fundurin haldast í seinasta lagi 1 mánað eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur móttikið málið.".

Stk. 2 – 4 verða eftir hetta stk. 3 – 5.

**47)** Í § 55, stk. 3, sum verður stk. 4, verður sum 2. pkt. sett:
"Í málum, har fyriskipan um umsorganaryvirtøku skal eftirmetast eftir § 24, skulu fosturforeldur kallast inn til fundin."

**48)** Yvir § 62 verður sum yvirskrift sett:
"*Flutt verður uttanlands*"

**49)** Í § 63 verður aftaná "er" sett: "millum barnaverndarnevndir í Føroyum".

**50)** Í § 66, stk. 1 verður "og avvarðandi barnaverndarnevnd" strikað.

**51)** § 70 verður orðað soleiðis:
"**§ 70**. Er tað eftir lógini um rættarstøðu barnanna álagt einum persóni at rinda barnagjald v.m. til eitt barn, ið verður sett heiman, gongur tað almenna í rættin til barnagjaldið frá gjaldskylduga, frá fyrsta uppihaldsdegi, tó í mesta lagi við eini upphædd samsvarandi við veruligu útreiðslurnar hjá tí almenna av uppihaldinum.
*Stk. 2*. Tað almenna gongur harafturat í rættin til at krevja barnagjald v.m. ásett ella at krevja barnagjaldið hækkað.
*Stk. 3*. Í sambandi við áseting ella hækking av barnagjaldi sambært stk. 2, kann tað almenna seta eina avtalu um barnagjald til viks, um so er, at avtalan má metast at vera gjørd við tí endamáli at forða tí almenna at fremja heimildina í hesi grein."

**52)** Í § 71, stk. 1 verður "15 ár" broytt til: "18 ár".

**§ 2**

*Stk. 1*. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2012.
*Stk. 2*. § 1, nr. 3 – 5 og § 1, nr. 6 viðvíkjandi § 5, stk. 1, 2. pkt. hava virknað frá næstu ferð, barnaverndarnevnd verður vald sambært § 4, stk. 3 í lógini.
*Stk. 3*. § 1, nr. 6 viðvíkjandi § 5, stk. 1, 1. pkt. hevur virknað fyri starvsfólk, ið verða sett eftir, at lógin er komin í gildi.

## Kap. 1 Almennar viðmerkingar

Galdandi barnaverndarlóg: "Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd" varð sett í gildi 1. januar 2006. Sambært § 84 í lógini, skal landsstýrismaðurin eftir 5 árum leggja fram fyri tingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, her undir um broytingar mugu gerast í skipanini.

Vísandi til § 84 í barnaverndarlógini setti táverandi landsstýriskvinna í almannamálum í 2009 ein arbeiðsbólk at endurskoða tilboð og skipanir til børn, ung og familjur við serligum tørvi. Arbeiðsbólkurin handaði landsstýriskvinnuni á Grækarismessu í 2010 álitið "Ein felags hurð". Í 2010 setti landsstýriskvinnan ein arbeiðsbólk at endurskoða barnaverndarlógina. Hesin arbeiðsbólkur handaði landsstýriskvinnuni eina frágreiðing í februar 2011. Grundað á álitið og frágreiðingina frá arbeiðsbólkunum, legði táverandi landsstýriskvinna í almannamálum eina frágreiðing fyri tingið til aðalorðaskiftis. Aðalorðaskiftið var í Løgtinginum hin 6. september 2011. Løgtingslimirnir vóru jaligir í mun til tær broytingar, ið landsstýriskvinnan vísti á.

Hetta lógaruppskot er grundað á tær broytingar, ið oman fyri nevnda álit og frágreiðing frá arbeiðsbólkunum vísa á, at tørvur er á at fremja.

Hugtakið "barn" verður í hesum lógaruppskoti brúkt bæði í mun til børn og ung, og sostatt eisini í mun til ung í aldrinum 18 – 23 ár, um annað ikki er tilskilað.

Eftir galdandi barnaverndarlóg, eru børn fevnd av lógini, inntil tey fylla 18 ár. Í serligum førum kann ein fyriskipan, ið er sett í verk, innan barnið hevur fylt 18 ár, tó halda áfram, til viðkomandi fyllir 21 ár.

Skiftið frá barni til vaksin er oftast ein trupul tíð hjá øllum børnum. Fyri børn við trupulleikum er henda tíðin ofta sera trupul. Kanningar í Danmark benda á, at tað er av sera stórum týdningi fyri børn, ið hava verið sett heiman, at tey fáa stuðul í skiftinum til eina vaksnamannatilveru (*Jakobsen, T. B., I. Hammen, L. Steen (2010). Efterværn – Støtte til tidligere anbragte unge. Midvejsevaluering af forsøg med efterværn under handlingeprogrammet "Lige muligheder". SFI 10:31*).

Børn við trupulleikum eru ofta ikki sjálvbjargin, tá tey gerast 21 ár, og hava tískil tørv á ávísum stuðli eina tíð afturat fyri at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Eftir galdandi áseting fer eitt barn, sum hevur tørv á hjálp ella stuðli, eftir at tað hevur fylt 21 ár, at kunna fáa hjálp ella stuðul eftir forsorgarlógini, um treytirnar annars eru loknar. Tað er sostatt ein annar myndugleiki, landið, ið tá skal yvirtaka málið. Hetta hevur við sær, at brot verður í hjálpini ella stuðlinum til barnið. Harafturat eru ikki somu heimildir í forsorgarlógini til hjálp og stuðul sum í barnaverndarlógini.

Mett verður, at við at broyta aldursmarkið til 23 ár, kunnu fleiri av børnunum koma at klára seg sjálv, við tað at betri framhald og samskipan verður í hjálpini í longri tíð enn við galdandi lóg. Neyðugt verður ikki at skifta til annan myndugleika at fáa hjálp fyrr enn fylta 23. árið.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Fyri at tryggja børnunum tryggar karmar og stuðul í skiftinum til eina vaksnamannatilveru, verður mælt til, at lógin skal fevna um børn til fylta 23. árið, tó soleiðis, at bert ávísar fyriskipanir, vanliga kallaðar eftirvernd, kunnu setast í verk fyri børn í aldrinum 18 til 22 ár. Hesar fyriskipanir verða ásettar í uppskotinum.

Um barnið framvegis hevur tørv á hjálp ella stuðli, eftir at tað hevur fylt 23 ár, kann barnið fáa hjálp ella stuðul eftir forsorgarlógini á sama hátt, sum tað kann í dag, tá tað hevur fylt 21 ár.

Eftir galdandi lóg skal fyri hvørja barnaverndarnevnd vera minst 1.500 íbúgvar. Mett verður, at økini í dag eru ov smá. Trupulleikin við smáum økjum er, at vandi er fyri, at barnaverndarmálini kunnu gerast persónlig, umframt at trupult kann vera hjá starvsfólkunum at fáa serkunnleika í at viðgera og loysa slík mál, tí nøgdin av málum er ov lítil. Harafturat kann verða trupult at fáa starvsfólk við neyðuga fakliga førleikanum til økið, eitt nú sosialráðgevarar, sálarfrøðingar, familjuráðgevar, námsfrøðingar v.m. Til tess at menna fakliga førleikan úti í økjunum verður, í sambandi við endurskoðanina av barnaverndarlógini, mælt til, at samstarvsøkini verða skipað samsvarandi lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur (løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007).

Barnaverndarmál eru sera viðkvom og trupul at umsita, bæði persónliga og fakliga. Fyri at tryggja, at mál verða viðgjørd á høgum fakligum støði, bæði í barnaverndarnevndini og -umsitingini, verður í lógaruppskotinum um broyting í løgtingslóg um barnavernd mælt til í ávísum førum at vaksa um samstarvseindirnar. Politisk undirtøka er ikki fyri at víkja frá krøvunum í lógini um kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, og fyri at fylgja grundtankanum í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur verður mælt til, at samstarvsøkini skulu skipast sbrt. § 2 í hesi lóg, ið ásetur, hvørjar eindir kommunal samstørv kunnu gerast innanfyri. Tvær av hesum eindum hava eitt íbúgvaratal, ið er undir 3.000, harav íbúgvaratalið í tí einu eindini (Sandoy) er undir 2.000.

Trupulleikin við, at einstøk øki eru ov lítil til einsamøll at umsita barnaverndarmál, verður tó við hesum ikki loystur, og tí verður mælt til, at økir kunnu samstarva við onnur økir um felags barnaverndarnevnd. Treytin er tá, at samstarvsøkini eru samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga, soleiðis at koyrast kann millum økini uttan at koyra gjøgnum annað økið, sum ikki er partur av samstarvinum.

Broytingin hevur við sær, at talið av barnaverndarnevndum fækkar við í minsta lagi trimum.

Henda broyting er í samsvari við aðalmálið í barnaverndarlógini, sum er at verja barnið og at styrkja rættartrygdina hjá bæði børnum og foreldrum. Tað verður ikki mett rímiligt, at hesi atlit skulu víkja fyri manglandi politiskum semjum um ein framtíðar kommunalan bygnað, og tí verður mælt til hesa broyting, og at tey smærru økini samstarva við onnur øki um felags barnaverndarnevnd.

Tá barnaverndarlógin varð samtykt í 2005, var henda lógin eitt gjøgnumbrot í kommunalpolitiskum høpi, við tað at samstarvsøkir vórðu ásett. Stórur illvilji var ímóti hesi

loysnini, sum hevur víst seg at verið so mikið væleydnað, at tað neyvan eru fleiri, sum í dag meta tað vera eina skeiva avgerð at leggja barnaverndarøkið út til kommunurnar.

Royndirnar seinastu árini hava eisini víst, at tað er umráðandi, at samstarvsøkini eru samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga, eins og lógin um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur ásetur, at fyrilit skulu havast fyri.

Mett verður, at tað eigur at verða hildið fast við verandi skipan við barnaverndarnevndum og barnaverndarumsitingum. Havandi í huga, at barnaverndarmál eru sera viðkvom og ofta sera trupul at umsita, verður tó mett, at tað eiga at verða sett hægri faklig krøv til limir í barnaverndarnevndini og starvsfólk í barnaverndarumsitingini til tess at tryggja, at málsviðgerðin er á høgum fakligum støði, bæði fyrisitingarliga og í mun til ta fyriskipan, ið verður sett í verk.

Eftir galdandi áseting skal formaðurin og meirilutin í barnaverndarnevndini hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Í viðmerkingunum til ásetingina verður mælt til, at limirnir hava eina miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk. Mett verður, at galdandi áseting er ov veikt orðað í mun til fakligan førleika, og at tað tískil, hóast viðmerkingarnar til galdandi áseting, er trupult at tulka, hvørji faklig krøv eru nøktandi hjá limunum. Henda meting er subjektiv og tískil trupul hjá eftirlitismyndugleikanum at meta um. Til tess at styrkja fakliga førleikan í barnaverndarnevndini og at gera ásetingina greiðari verður mett rættast, at fakliga kravið er viðkomandi faklig *útbúgving*.

Í mun til starvsfólk í barnaverndarumsitingini er fakliga kravið í galdandi lóg miðallong útbúgving. Í upprunauppskotinum til løgtingslóg um barnavernd, sum varð løgd fyri Løgtingið, var ásett, at útbúgvingin skuldi vera innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk. Hetta varð tó broytt í sambandi við viðgerðina av uppskotinum, soleiðis at fakliga kravið varð linkað til miðallanga útbúgving. Við galdandi orðing er ikki krav um fakliga viðkomandi útbúgving, t.e. at ein 2-4 ára vinnuyrkislig útbúgving er nøktandi. Hetta verður mett at vera sera óheppið. Mett verður, at tað er av avgerandi týdningi fyri at tryggja nøktandi málsviðgerð og fyri at tryggja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum, at starvsfólk í barnaverndarumsitingini hava góðan viðkomandi fakligan førleika til at viðgera og loysa tey mál, sum koma.

Ein uppgáva hjá Barnaverndarstovuni er at veita samdøgursstovnunum ráðgeving og vegleiðing, her í millum námsfrøðiliga ráðgeving. Mett verður, at tað ikki er rætt, at Barnaverndarstovan, sum ein felagskommunalur stovnur, ráðgevur og vegleiðir samdøgursstovnum, ið eru landsstovnar. Til tess at tryggja, at tørvurin á tilboðum verður nøktaður, eiga samdøgursstovnar altíð at tillaga tilboðini á stovninum í samráð við Barnaverndarstovuna. Hetta samsvarar eisini tí siðvenju, sum er á økinum.

Vísandi til endamálið við lógini og týdningin av, at barnið og familjan fáa neyðuga hjálp tíðliga, verður mælt til at gera broytingar í ásetingunum um fráboðanarskyldu.

Eftir galdandi orðing skulu tey, sum í starvi sínum hava við børn at gera, vanliga nevnd fakfólk, fráboða barnaverndartænastuni, um tey fáa *kunnleika* til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini. Fakfólk hava sostatt ikki skyldu til at fráboða, fyrr enn tey hava eina ávísa vitan um viðuskiftini; ein illgruni ella varhugi ger ikki, at fakfólk hevur fráboðanarskyldu. Mett verður, at galdandi krav um kunnleika, kann hava við sær, at fakfólk, sum bert hava ein varhuga

av, at viðurskifti eru, ið kunnu skaða heilsu og menning hjá einum barni, ikki fráboða henda varhuga, hóast tey eru stúrin um barnið. Fyri at tryggja, at einhvør ivi kemur barninum til góðar, og at tað, um neyðugt, verður sett inn við eini fyriskipan so tíðliga sum gjørligt, verður mælt til, at fráboðanarskyldan hjá fakfólki verður skerpað soleiðis, at tey eisini skulu fráboða, um tey hava *orsøk til at halda*, at komið eigur at vera uppí eftir lógini.

Fráboðanarskylda áliggur eisini øllum borgarum, ið eftir galdandi orðing skulu fráboða, um tey fáa kunnleika til, at eitt barn verður t.d. misrøkt ella misnýtt soleiðis, at *álvarsamur* vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning. Henda orðing kann hava við sær, at ein borgari aftrar seg við at fráboða, tí viðkomandi ikki veit, um talan er um *álvarsaman* vanda. Fyri at tryggja, at einhvør ivi kemur barninum til góðar, og fyri at tryggja at fráboðað verður so tíðliga sum gjørligt, verður mælt til at broyta orðingina so hon gerst greiðari, eins og orðið "*álvarsamur*" ikki verður brúkt.

Í mun til kvinnu, ið er við barn, skal eftir galdandi áseting fráboðast, um mett verður, at tørvur er á stuðli sambært barnaverndarlógini, t.d. vegna *álvarsama* rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar. Fyri at ivin skal koma ófødda barninum til góðar, verður mælt til at strika orðið *álvarsama*. Fyri at gera orðingina greiðari, og fyri at tað greitt skal koma fram, at tørvur eisini kann vera á stuðli orsakað av sosialum trupulleikum, verður harafturat mælt til at broyta orðingina "sálarsjúku ella sálartrupulleikum" til "sosialum ella sálarligum ávum".

Orðingin í mun til sosialt frípláss er nakað ógreið, og ivi er um, nær sosialt frípláss kann veitast, her í millum um foreldrini kunnu verða kravd eftir gjaldi, um barnaverndarnevndin, við heimild í § 15, stk. 2, áleggur teimum at lata barnið fara á t.d. dagstovn uttan samtykki. Mælt verður til at broyta ásetingina soleiðis, at tað greitt kemur fram, at sosialt frípláss kann veitast, um tað av sosialum orsøkum verður mett neyðugt, umframt at tað ikki kann áleggjast foreldrum at rinda fyri sosialt pláss á stovni, um barnið verður sett á dagstovn ella dagrøkt av sosialum orsøkum. At foreldur ikki skulu rinda fyri sosialt pláss er í samsvari við § 70 a í barnaverndarlógini og galdandi siðvenju hjá barnaverndartænastunum.

Barnaverndarnevndin hevur eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk. Galdandi áseting hevur einki minsta mark fyri, hvussu ofta metast skal um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan, ella fyriskipanin eigur at broytast. Víst hevur verið á, at ivi er um, hvat ásetingin inniber. Fyri at tryggja, at nøktandi eftirlit er við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk, og fyri at tryggja, at fyriskipanin tænir endamálinum, verður mælt til at áseta eitt greitt minsta mark fyri, hvussu oftani metast skal um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan ella eigur at broytast. Harafturat verður mælt til at orða ásetingina greiðari.

Ásetingarnar um familjuviðgerð eru ógreiðar, serliga í mun til, nær tað er barnaverndartænastan, ið skal veita familjuviðgerð, og nær tað er landið. § 15, stk. 1, nr. 2 heimilar barnaverndarnevndini at seta fyriskipan um familjuviðgerð ella líknandi stuðul í verk við samtykki. Eingin áseting er, sum greitt ásetur, at landið stovnsetur og rekur samdøgursstovnar til familjuviðgerð, men § 69, stk. 1 ásetur, at landið heldur útreiðslurnar fyri familjuviðgerð á samdøgurstovnum. Áseting er harafturat um, at mál um familjuviðgerð á stovni hjá landinum, skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Mælt verður til at gera sjálvstøðuga áseting um familjuviðgerð á stovni hjá landinum, og greitt at áseta, at landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar til familjuviðgerð.

Endamálið við broytingunum er at gera greiðan skilnað ímillum, nær familjuviðgerð er viðgerð, ið barnaverndartænastan skal veita, og nær tað er ein viðgerð, ið stovnur hjá landinum skal veita.

Í sambandi við at familjur verða innskrivaðar á stovn hjá landinum sum samdøgurstilboð, kann barnaverndarnevndin eftir galdandi áseting veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið standast av fyriskipanini, um foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. Foreldrini fáa sostatt ikki altíð endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Tað hevur víst seg, at fíggjarliga óvissan hjá foreldrunum órógvar viðgerðina. Tí skil verður mælt til, at foreldrini skulu fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tó í mesta lagi við eini upphædd samsvarandi við hægstu sjúkradagpeningaveiting.

Í nøkrum førum er best fyri eitt barn, at tað flytur heimanífrá, áðrenn tað fyllir 18 ár. Talan er um mál, har barnið er væl ment, men treytirnar fyri umsorganaryvirtøku ikki eru loknar, hóast umstøðurnar í heiminum ikki eru góðar fyri barnið. Ásetingarnar í § 15, stk. 1 eru orðaðar soleiðis, at tær kunnu tulkast vítt. Mett verður, at heimild er í § 15, stk. 1 at veita stuðul til barn í egnum kamari ella lítlari íbúð, á sama hátt sum heimild er í § 15, stk. 1, nr. 5 til at senda børn á eftirskúla. Heimildin verður brúkt í dag, og eru børn sum fáa stuðul í egnum kamari. Hóast heimildin longu er, verður mælt til at áseta, at barnaverndarnevndin kann veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella íbúð. Hetta fyri at gera hesa fyriskipan sjónligari og samstundis avmarka hesa fyriskipan til børn 16 ár ella eldri. Ætlanin er ikki at gera aðrar innihaldsligar broytingar í heimildini.

Sambært galdandi lóg kann barnaverndarnevndin, sum eina fyribyrgjandi fyriskipan, tilnevna barninum ein fastan persón, ið barnið altíð kann venda sær til. Í uppskotinum verður ásett, at barnaverndartænastan hevur skyldu til at hjálpa barninum við at finna ein persón, ið kann tilnevnast sum fastur persónur hjá barninum, meðan tað er umsorganaryvirtikið. Endamálið við fasta persóninum er at fyribyrgja, at barnið følir seg einsamalt og at stuðla barnsins møguleikum í at hava eitt størri netverk, meðan barnið er sett heiman, og aftaná at tað er farið heim ella at búgva sjálvstøðugt.

Tørvur er á at víðka greinina um varandi umsorganaryvirtøku. Galdandi orðing er í ávísum førum ein forðing fyri varandi umsorganaryvirtøku, hóast tað er sannlíkt, at foreldrini varandi vanta foreldraførleika. Hetta tí tað ikki altíð er nøkur sálarlig sjúkuavgerð. Harafturat tekur galdandi áseting ikki atlit til, at eitt barn, ið hevur verið til fosturs í longri tíð, kann hava fingið størri tilknýti til fosturforeldrini, enn tað hevur til biologisku familjuna, og at tað tí kann vera barnsins besta at sleppa at vera verandi hjá fosturfamiljuni. Í uppskotinum verður greinin víðkað, so hon tekur áður nevndu atlit.

Ongar ásetingar eru, ið áseta nágreiniliga, nær ella hvussu ofta eitt mál, har eitt barn er umsorganaryvirtikið, skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetingar. Siðvenjan er, at ein avgerð um umsorganaryvirtøku vanliga verður tikin fyri eitt ár í senn, í serligum førum tó fyri longri tíð. Um fyriskipanin skal halda fram, skal barnaverndarnevndin leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, áðrenn avgerðin hjá nevndini rennur út. Um barnaverndarnevndin

ikki metir, at fyriskipanin skal halda fram, og at barnið skal setast heim aftur, verður málið ikki lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina uttan so, at barnið skal setast heim aftur áðrenn tíð.

Fyri at hava fastar reglur um, nær og hvussu ofta ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetingar, verður mælt til at áseta reglur um hetta. At málið verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er við til at tryggja, at fyriskipanin ikki heldur fram uttan so, at treytirnar fyri umsorganaryvirtøku framvegis eru til staðar. Eisini verður mælt til, at eitt barn bert kann setast heim aftur, um Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um hetta, eins og tað skal ásetast eitt tíðarskeið at fyrireika heimsetanina. Hetta er við til at tryggja, at eitt barn ikki verður sett heim aftur, um umstøðurnar í heiminum ikki eru broyttar soleiðis, at barnið kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, og at tryggja barninum, at heimsetanin er fyrireikað. Uppskotið er ein liður í at styrkja rættartrygdina hjá bæði foreldrum og børnum.

Mál, ið skulu eftirmetast, verða til tíðir ikki send skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyrr enn beint áðrenn ella aftaná, at avgerðin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini rennur út. Hetta hevur við sær, at tíðin, ið skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini hevur at kanna, um málið er nóg væl upplýst, og at biðja um manglandi upplýsingar, er sera stutt, um eftirmetingin skal leggjast fyri nevndina, áðrenn avgerðin rennur út. Hetta er ikki nøktandi. Rættast er, at foreldur og børn í góðari tíð vita, hvat skal henda. Tí skil verður mælt til at áseta, nær barnaverndarnevndin í seinasta lagi skal senda eftirmetingina til Høvuðsbarnaverndarnevndina, um eftirmetingin skal leggjast fyri nevndina, áðrenn freistin rennur út. Á henda hátt verður tað meira sjónligt hjá barnaverndarnevndunum, at tær skulu senda málini inn í góðari tíð, og harvið eigur tað ikki at koma fyri, at mál ikki verða løgd fyri nevndina rættstundis. Samstundis verður mælt til, at ein bráðfeingis avgerð um umsorganaryvirtøku kann standa við í fýra mánaðir, og ikki tríggjar. Hetta fyri at barnaverndartænastan framvegis hevur tríggjar mánaðir at kanna málið, áðrenn tilmæli skal sendast Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Eftir galdandi áseting, eru somu krøv til góðkenning av fosturforeldrum, uttan mun til hvørt talan er um næstringar ella onnur fosturforeldur, ið ikki hava tætt samband við barnið. Mett verður, at atlit eiga at verða tikin til barnið soleiðis, at barnið kann verða sett til fosturs hjá onkrum, sum barnið hevur samband við og tilknýti til, um hesi eru egnað at verða fosturforeldur hjá barninum, og at krøvini til eitt nú bústað og aldur í hesum sambandi eiga at verða linkað. Tí skil verður mælt til, at næstringar og onnur við tøttum sambandi til barnið kunnu verða góðkend, um tey verða mett ítøkiliga egnað í mun til tað ávísa barnið. Harvið eru ikki somu krøv galdandi til hesi fosturforeldur sum onnur.

Fosturforeldraskipanin skal eftir galdandi áseting stuðla og fyrireika fosturforeldur, áðrenn barnið verður latið teimum. Tað er tó ikki eitt krav, at fosturforeldur luttaka á fyrireikandi skeiði. Mett verður, at øll fosturforeldur skulu luttaka á einum fyrireikandi skeiði fyri at tryggja, at tey hava neyðuga vitan um tað at vera fosturforeldur. Tí skil verður mælt til, at øll fosturforeldur skulu luttaka á einum skeiði um at vera fosturforeldur - helst áðrenn barnið verður latið teimum.

Eftir galdandi áseting er tað Fosturforeldraskipanin, ið rindar fosturforeldrum samsýning. Siðvenjan er, at avvarðandi barnaverndartænasta rindar samsýningina. Mælt verður til at broyta ásetingina soleiðis, at hon er í samsvar við galdandi siðvenju.

Galdandi ásetingin um inn- og útskriving á stovn er ógreitt orðað, og kann skiljast soleiðis, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, sum finnur stovnin til barnið. Hetta er ikki í samsvari við málsviðgerðarreglurnar, ið áleggja barnaverndartænastuni at lýsa málið. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur bert avgerð í málinum eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini. Tó tryggjar Høvuðsbarnaverndarnevndin sær, at tann stovnur, sum barnaverndarnevndin mælir til, kann nøkta tørvin hjá barninum. Orsøkin til ógreiðu orðingina er helst, at orðingin varð broytt í sambandi við viðgerðina av upprunauppskotinum til lóg um barnavernd.

Mælt verður til at broyta orðingina soleiðis, at tað greitt kemur fram, at Høvuðsbarnaverndarnevndin einans tekur avgerð eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini.

Samstundis verður mælt til, at Høvuðsbarnaverndarnevndin skal kunna taka endaliga avgerð um, at eitt barn skal innskrivast á stovn uttanlands uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Hetta tí mett verður, at landsstýrismaðurin ikki hevur fakligar førleikar at meta um, hvørt tilmælta plássið er rætta tilboðið til barnið. Hesar førleikar hevur Høvuðsbarnaverndarnevndin. Fyri at tryggja, at landsstýrismaðurin fær kunnleika til, hvussu nógv børn verða sett á stovn uttanlands og hví, kann landsstýrismaðurin áleggja Høvuðsbarnaverndarnevndini at senda honum frágreiðing hesum viðvíkjandi, t.d. hálva hvørt ár.

Hóast sektorábyrgdin er galdandi, eru tilboð til børn ikki raðfest innan allar sektorar. Hetta hevur við sær, at nøktandi tilboð ikki eru til børn innan allar sektorar, ella at langur bíðilisti er. Hetta er als ikki nøktandi, vísandi til, at tað er sera umráðandi, at rættar fyriskipanir verða settar inn tíðliga, áðrenn trupulleikarnir hjá barninum gerast ov stórir. Tá rætta tilboðið ikki er til staðar, er neyðugt at seta aðrar ikki nøktandi fyriskipanir í verk, og hevur hetta bæði menniskjaligar og fíggjarligar avleiðingar við sær.

Fyri at kunna seta inn við rættari fyriskipan beinanvegin, er ofta neyðugt, at barnið er útgreinað. Í dag kann tað taka fleiri ár frá tí, at illgruni er um, at eitt barn hevur serligan tørv, til endalig útgreining fyriliggur. Hetta orsakað av langari bíðitíð á bæði Sernám og Psykiatriska deplinum, ið hava ábyrgdina av at útgreina børn.

Um eitt barn hevur álvarsamar trupulleikar, er vanligt, at bæði foreldur og barnið ynskja, at barnið verður kannað fyri at fáa avklárað, hvat orsøkin er til trupulleikarnar, og hvussu teir kunnu loysast. Um foreldur og eitt barn, ið hevur fylt 15 ár, ikki ynskja, at barnið verður kannað, hevur Høvuðsbarnaverndarnevndin eftir galdandi lóg, heimild til at taka avgerð um, at eitt barn, sum hevur víst álvarsamar atferðartrupulleikar, verður sett á stovn til eygleiðingar, kanningar og viðgerð í upp til 4 vikur uttan samtykki. Galdandi heimild fevnir ikki um sjúkrahús.

Tað kunnu vera føri, har viðurskiftini eru álvarsom, men ivasamt er, um vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og tað tí er tørvur á at fáa barnið kannað og harvið fáa avklárað, um grundarlag er fyri at seta barnið heiman. Tískil verður mælt til at geva Høvuðsbarnaverndarnevndini heimild til at taka avgerð um eygleiðing og kanning á stovni ella sjúkrahúsi, bæði á somatiskari og psykiatriskari deild, uttan foreldranna og barnsins samtykki.

Harafturat verður mælt til, at ein slík eygleiðing og kanning skal vera liðug innan 2 mánaðir eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur tikið avgerð um hetta. Hetta áleggur teimum

myndugleikum, ið hava ábyrgd av at eygleiða og kanna barnið, skyldu til at gera hetta eftir avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Børn hava sambært psykiatrilógini (anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om tvang i psykiatrien) sjálvstøðug rættindi. Setur barn ella ungur seg ímóti at leggjast inn á psykiatrisku deild, skulu mannagongdirnar í psykiatrilógini nýtast umframt.

Sernám, ið hevur ábyrgd av einum parti av útgreining av børnum, hevur ongan samdøgursstovn, har børn kunnu innskrivast. Tískil er neyðugt at barnið, um eygleiðingin og kanningin ikki kann gerast ambulant, verður innskrivað á samdøgursstovn hjá Børn & Ung (Almannastovan/Nærverkið), men tað er tó Sernám, ið hevur skyldu til og ábyrgdina av at gera neyðugu eygleiðingarnar og kanningarnar. Hesar mugu so gerast í samstarvi við samdøgursstovnin.

Um rímilig orsøk er at halda, at eitt barn hevur tørv á, at ein fyriskipan verður sett í verk, skal barnaverndarumsitingin kanna málið. Endamálið við kanningini er at finna fram til, um ein fyriskipan skal setast í verk, og um so er, hvør fyriskipan verður mett at kunna hjálpa og skal setast í verk. Kanningin er grundarlagið undir avgerðini hjá barnaverndarnevndini. Tess betur kanningin lýsir støðuna og tørvin hjá barninum og familjuni, tess størri er møguleikin fyri, at rætta fyriskipanin verður sett í verk beinanvegin.

Galdandi áseting allýsir ikki, hvørji viðurskifti eiga at kannast, men ásetur, at frágreiðing skal fáast til vega frá teimum, ið verða mett at kunna geva týðandi frágreiðingar í málinum.

Fyri at tryggja, at øll viðkomandi viðurskifti verða væl lýst, og grundarlagið undir avgerðini er so gott sum møguligt, verður mælt til at allýsa í ásetingini, hvørji viðurskifti kanningin skal fevna um. Harumframt at kanningin skal taka støði í eini heildarmeting av tørvinum hjá barninum og familjuni.

Tað er umráðandi, at ein ætlan er løgd fyri ta fyriskipan, ið verður sett í verk. Hetta fyri at tryggja, at foreldur og børn vita, hví fyriskipanin verður sett í verk, og fyri at kunna meta um, nær endamálið er rokkið, ella um onnur fyriskipan eigur at setast í verk. Ætlanin er eitt arbeiðsamboð, ið gevur øllum pørtum, ið eru knýttir at fyriskipanini, eina felags fatan av innihaldi og endamáli við fyriskipanini. Galdandi áseting er nakað ógreið, og hevur hetta við sær, at tað er ymiskt, hvussu neyvar ætlanirnar eru, sum verða gjørdar. Tí verður mælt til at broyta orðingina soleiðis, at tað verður heilt greitt, hvørjar ætlanir barnaverndartænastan skal gera, og innihaldið í ætlanunum.

Galdandi orðing er ógreið í mun til, um Barnaverndarstovan hevur heimild til at taka avgerð, tá ósemja er millum føroyska barnaverndarnevnd og útlendskan myndugleika. Tískil verður greinin orðað soleiðis, at tað greitt kemur fram, at Barnaverndarstovan bert kann taka avgerð í málum, har ósemja er millum føroyskar barnaverndarnevndir.

Avgerðir tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini kunnu kærast til Føroya Rætt, meðan avgerðir, tiknar av barnaverndarnevndini, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Sambært § 66 í barnaverndarlógini hevur barnaverndarnevndin rætt til at kæra avgerðir, tiknar sambært lógini. Sambært § 468 a, stk. 4 í rættargangslógini (bekendtgørelse nr. 148 fra 9. marts

2004 af lov for Færøerne om rettens pleje, som senest ændret ved lov nr. 414 af 9. maj 2011), eru tað bert foreldur og børn, ið hava fylt 15 ár, ið eru partar í málinum, og harvið hava kærurætt. Barnaverndarnevndin hevur sostatt ikki rætt til at kæra avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini til Føroya Rætt.

Sum eina avleiðing av, at barnaverndarnevndin ikki hevur rætt til at leggja avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri Føroya Rætt, verður barnaverndarnevndin strikað úr § 66.

Barnaverndarnevndin kann hava áhuga í at leggja avgerðir hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum fyri Føroya Rætt, og kann gera hetta uttan nakra áseting í barnaverndarlógini.

Eftir galdandi áseting, sum er § 6 í kunngerð nr. 85, frá 7. september 2007 um uppalingarískoyti , kann uppalingarískoyti, samsvarandi við 50 % av vanliga barnagjaldinum eftir lógini um rættarstøðu barnanna (lov nr. 200 af 18. maj 1960 om børns retsstilling, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010), áleggjast foreldrum í tíðini, barnið er sett heiman, um foreldrini hava eina inntøku, sum er hægri enn hægsta sjúkradagpeningaveiting. Mælt verður til at broyta greinina um uppalingarískoyti soleiðis, at heimildin, sum er í lógini um rættarstøðu barnanna, verður brúkt. Hetta hevur við sær, at tað almenna gongur í rættin at fáa longu ásett barnagjald frá gjaldskylduga, eins og tað almenna kann krevja barnagjald ásett ella hækkað.

Við at brúka reglurnar í lógini um rættarstøðu barnanna, verða foreldur, ið ikki hava barnið búgvandi hjá sær javnsett, uttan mun til um orsøkin er, at barnið er sett heiman, ella orsøkin er, at foreldrini eru farin frá hvørjum øðrum. Í báðum førum verða foreldrini áløgd at rinda barnagjald, ella onnur gjøld, um treytirnar annars eru loknar, og í báðum førum er møguligt at søkja um stuðul til uppihaldspening eftir lóg um stuðul til uppihaldspening (løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 28. desember 2010).

Tá barn verður uppihildið av einum myndugleika, fellur møguligur rættur til forskotsrindan av barnagjaldi burtur sambært § 3, stk. 2, nr. 4 í lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. (løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 16 frá 2. mars 2011). Eisini fellur rætturin til barnafrádrátt í skatti burtur sambært § 2, stk. 1, 3. pkt. í ásetingarlógini (løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 22. desember 2009).

Eitt barn, ið hevur fylt 15 ár, kann eftir galdandi áseting, sum er § 10 í kunngerð nr. 85, frá 7. september 2007 um uppalingarískoyti, áleggjast at gjalda uppalingarískoyti, ímeðan tað er sett heiman. Mett verður, at tað ikki er rætt at áleggja barni undir 18 ár at rinda fyri uppihald, meðan tað er sett heiman. Mett verður tó, at ung, ið hava fylt 18 ár, eiga at kunna áleggjast at gjalda eitt ískoyti fyri uppihaldið, tá hetta verður mett at kunna vera við til at menna tann unga til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru.

Viðmerkjast skal, at í tann mun, tað í sambandi við endurskoðanina av barnaverndarlógini hevur verið mælt til broytingar, ið eru samanfallandi við Barnets Reform, ið kom í gildi í Danmark í 2011, er hetta lógaruppskot tilevnað við Barnets Reform sum fyrimynd.

***Ummæli:***
Uppskotið er sent til ummælis hjá Barnaverndarstovu Føroya, Høvuðsbarnaverndarnevndini, Nærverkinum/Almannastovuni, Fosturforeldrafelagnum, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag, Innlendismálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Mentamálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Ríkisumboðnum, Sosialráðgevarafelag Føroya, Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Ljósmøðrafelag Føroya, Føroyskir Sálarfrøðingar, Almanna- og heilsurøktarafelagið, MBF, og Føroya Landfúta.

Barnaverndarstova Føroya metir ikki, at § 13, stk. 2, nr. 2 og 5 í barnaverndarlógini skulu strikast.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður, at uppskotið viðførir fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

At aldursmarkið verður hækkað upp í 23 ár fer væntandi at hava við sær, at fleiri megna at gera eina útbúgving lidna og kunna fasthalda arbeiðið. Harvið verða væntandi færri, ið fara at hava tørv á hjálp og stuðli eftir forsorgarlógini, og at útreiðslurnar tí vaksa minni, enn tær annars høvdu gjørt.

Hinvegin verða útreiðslurnar til fyriskipanir størri, bæði fyri kommunurnar og fyri landið, tí fyriskipanir kunnu halda fram í longri tíð fyri tað einstaka barnið. Landið hevur ábyrgdina av og rindar útreiðslurnar fyri rakstur av samdøgursstovnum og øðrum samdøgursfyriskipanum, meðan kommunurnar rinda útreiðslurnar fyri aðrar fyriskipanir. Miðalkostnaðurin fyri hvørt pláss er mett at verða umleið 1. mió. kr. árliga.

At samstarvsøkini gerast størri, hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Mett verður heldur ikki, at tað hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Tað verða færri barnaverndarnevndir, men hvør einstøk nevnd fær fleiri mál at viðgera. Samanumtikið verður mett, at samlaða samsýningin til limirnar broytist ikki stórvegis.

Mett verður, at fakligu krøvini til limirnar í barnaverndarnevndunum ikki hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Limirnir fáa fasta samsýning, ið ikki er ásett í mun til faklig krøv. Hinvegin kunnu fakligu krøvini til starvsfólkið í barnaverndarumsitingunum hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Skerpingin av fráboðanarskylduni eigur at hava við sær, at fleiri fráboðanir verða. Harvið verða fleiri mál hjá barnaverndartænastunum at viðgera, og kann hetta møguliga hava við sær, at neyðugt verður við fleiri starvsfólkum í barnaverndarumsitingini. Harafturat kann væntast, at fleiri fyriskipanir verða settar í verk og harvið fleiri útreiðslur fyri kommunurnar og landið.

Hinvegin eigur skerpingin av fráboðanarskylduni at hava við sær, at tað verður sett inn fyrr enn í dag, og at inntrivini gerast minni og fyriskipanirnar í síðsta enda bíligari enn í dag.

Við tað at fíggjarligu viðurskiftini hjá foreldrunum ikki longur hava týdning í mun til, um sosialt fríplass kann veitast, kann væntast at henda broyting fær fíggjarligar avleiðingar fyri

kommununrnar, tí fleiri væntandi kunnu fáa sosialt fríplássi. Í 2010 vórðu játtað 58 sosial frípláss. Útreiðslurnar hjá barnaverndartænastunum til hesar fyriskipanir vóru í alt umleið 1 mió. kr. í 2010.

Tað hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, um tær skulu rinda endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Hægsta sjúkradagpeningaveiting er í dag 17.072 kr. um mánaðin. Í 2010 vóru fimm familjur innskrivaðar á Familjudepilin, og vóru tær í miðal innskrivaðar í 3 mánaðir.

Mett verður, at uppskotið ikki kemur at hava fíggjarligar avleiðingar í mun til Høvuðsbarnaverndarnevndina. Hetta tí at samlaða umsitingin/arbeiðsbyrðan ikki verður mett at gerast størri, enn hon er í dag. Øll mál um at enda umsorganaryvirtøku skulu leggjast fyri nevndina, men samstundis skulu mál um umsorganaryvirtøku ikki leggjast fyri á hvørjum ári.

Kravið um, at øll fosturforeldur skulu luttaka á einum skeiði, tá tey skulu hava barn til fosturs, kemur væntandi at hava nakað av fíggjarligum avleiðingum fyri Fosturforeldraskipanina. Við tað at Fosturforeldraskipanin longu hevur uppgávuna at fyrireika fosturforeldur, verður tó mett, at fíggjarligu avleiðingarnar ikki verða so stórar, men at talan meira verður um at umskipa og tillaga undirvísingina til nýggju krøvini.

Heimildin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini at innskriva børn á stovn ella innleggja tey á sjúkrahús til eygleiðing og kanning, kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið, um tilboðið ikki er til staðar, og tað tískil er neyðugt at víðka um virksemið. Harafturat kann tørvur verða á fleiri plássum á stovninum hjá Børn & Ung (Almannastovan/Nærverkið), um pláss skulu verða tøk til at innskriva børn til eygleiðing og kanning, sum skulu fremjast av Sernám. Um stovnarnir hjá landinum ikki kunnu taka í móti øllum børnum, verður neyðugt at víðka um tilboðið hjá landinum, og harvið hækka játtanina til endamálið. Miðalkostnaðurin fyri hvørt barnið er mettur at vera umleið 1 mió. kr. Um tað ikki ber til at víðka um virksemið hjá verandi stovnum, verður neyðugt at seta á stovn nýggjan stovn, og kostar hetta umleið 4 – 5 mió. kr. Fyri Sernám kann verða tørvur á fleiri starvsfólkum til at fremja eygleiðingarnar og kanningarnar.

Broytingin í uppskotinum í mun til kanning av málinum eigur ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Uppskotnu broytingarnar í mun til ætlanina fyri barnið og familjuna koma at hava ávísar fíggjarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar, tí uppskotið setir størri krøv til ætlanina í mun til skiftið til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Uppalingarískoytið, ið foreldur kundu áleggjast at rinda, um treytirnar annars vóru loknar, samsvaraði við 50% av vanliga barnagjaldinum, sum í dag er 1.056 kr. um mánaðin. Við broytingini skulu foreldrini, sum verða áløgd at rinda barnagjald, hvør í minsta lagi rinda vanligt barnagjald. Hetta hevur við sær, at tann myndugleiki, ið rindar útreiðslurnar fyri barnsins uppihald, meðan tað er sett heiman, fær hægri inntøkur. Inntøkurnar hjá landinum verða tó minni enn fyri kommunurnar, tí foreldrini samstundis hava rætt til stuðul til uppihaldspening, samsvarandi við 40% av tí goldnu upphædd, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn. Uppalingarískoytið gav ikki rætt til stuðul til uppihaldspening.

Fyri foreldur verða fíggjarligu avleiðingarnar, at tey koma at rinda nakað hægri gjald – í minsta lagi vanliga barnagjaldið í staðin fyri eina upphædd samsvarandi við 50% av vanliga barnagjaldinum. Samstundis kunnu tey tó fáa stuðul til uppihaldspening, samsvarandi við 40% av tí goldnu upphædd, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður, at uppskotið viðførir umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

At aldursmarkið verður hækkað upp í 23 ár hevur við sær, at børnini verða fevnd av barnaverndarlógini í longri tíð. Harvið skulu barnaverndartænasturnar umsita og viðgera málini í longri tíð enn eftir galdandi lóg. Tað sama er galdandi fyri samdøgursfyriskipanir hjá landinum.

Harafturat fer broytingin væntandi at hava við sær, at færri fara at hava tørv á hjálp og stuðli eftir forsorgarlógini. Harvið verða færri mál hjá Almannastovuni at viðgera.

At samstarvsøkini gerast størri hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Fyri kommunurnar merkir kravið um størri samstarvsøki, at ávísar kommunur, sum í dag hava egna barnaverndarnevnd, frameftir skulu samstarva við aðra kommunu ella annað samstarvsøki um felags barnaverndarnevnd. Frameftir verða færri barnaverndarnevndir. Tískil fer tann einstaka barnaverndarnevndin at hava fleiri mál at viðgera.

Fakligu krøvini til limirnar í barnaverndarnevndunum og starvsfólk í barnaverndarnevndarumsitingunum gera møguliga, at onkur kommuna, ið lýkur krøvini til íbúgvaratal, má samstarva við aðra kommunu ella annað samstarvsøki orsakað av, at kommunan ikki fær limir og starvsfólk við nøktandi fakligum førleika.

At Barnaverndarstova Føroya ikki longur skal veita samdøgursstovnum ráðgeving og vegleiðing, hevur væntandi ongar ella bert smávegis umsitingarligar avleiðingar.

Fleiri fráboðanir merkja, at fleiri mál verða hjá barnaverndartænastuni at viðgera.

Sosial frípláss gerast lættari hjá barnaverndartænastuni at umsita, tí fíggjarligu viðurskiftini hjá foreldrunum eru ikki longur viðkomandi.

Í útgangsstøðinum eigur ásetingin um eftirlit ikki at hava nakrar umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar, tí tær longu nú hava skyldu til at meta um fyriskipanina við jøvnum millumbilum. Tað má tó væntast, at onkur mál eru í dag, har eftirlit ikki verður framt so ofta, sum skotið verður upp, og at barnaverndartænasturnar tí mugu gera fleiri eftirlit, enn tær gera í dag.

Tað verður mett ikki at hava serligar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar, at tær í sambandi við familjuviðgerð skulu rinda endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tí tað skulu tær eisini gera í dag, um familjurnar ikki sjálvar megna at halda hesa útreiðslu.

Roknast má við, at fleiri børn kunnu verða varandi umsorganaryvirtikin, tá heimildin verður víðkað. Tá eitt barn er varandi umsorganaryvirtikið, skal málið ikki leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina aftur, uttan so, at umstøðurnar hjá foreldrunum eru munandi

broyttar. Hesi mál hava tískil ikki økta umsiting fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Mett verður, at tað heldur ikki hevur stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar, at heimildin fyri varandi umsorganaryvirtøku verður víðkað. Barnaverndartænastan hevur framvegis eftirlit við fyriskipanini.

Vanliga verða mál løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eina ferð um árið. Við uppskotinum skulu nøkur av hesum málum ikki leggjast fyri nevndina meira enn annað hvørt ár. Hetta eigur at hava við sær, at færri mál verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Mett verður tó, at talan verður um lutfalsliga fá mál, og at tað tí ikki kemur at hava serligan týdning fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Tað sama ger seg galdandi í mun til barnaverndartænasturnar. Broytingin hevur ongan týdning í mun til, hvussu ofta tey skulu eftirmeta málini, men bert í mun til hvussu ofta mál um umsorganaryvirtøku í minsta lagi skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

At áseta hvussu langa tíð, skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini hevur at kanna mál, hevur við sær, at barnaverndartænasturnar skulu hava málini klár eitt sindur fyrr enn í dag. Hinvegin er avleiðingin fyri skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, at tey hava tíð at kanna eftir, um málið er væl upplýst, og ikki sum nú skulu gera hesa kanning í skundi.

Kravið um, at øll fosturforeldur skulu luttaka á einum skeiði, helst áðrenn tey fáa nakað barn til fosturs, kemur væntandi at hava nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Fosturforeldraskipanina. Við tað at Fosturforeldraskipanin longu hevur uppgávuna at fyrireika fosturforeldur, verður tó mett, at avleiðingarnar ikki vera so stórar, men at talan meira verður um at umskipa og tillaga undirvísingina til nýggju krøvini.

At geva Høvuðsbarnaverndarnevndini heimild til at taka endaliga avgerð um at seta barn á stovn uttanlands, lættir um umsitingina av slíkum málum, bæði hjá skrivstovuni hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini og hjá Almannamálaráðnum. Harafturat styttir tað um viðgerðartíðina av slíkum málum.

Heimildin, sum mælt verður til at geva Høvuðsbarnaverndarnevndini til at taka avgerð um at seta barn á stovn ella innleggjast á sjúkrahús uttan samtykki, til eygleiðing og kanning, hevur umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar, Høvuðsbarnaverndarnevndina, sjúkrahúsverkið og Sernám. Fyri barnaverndartænasturnar og Høvuðsbarnaverndarnevndina er talan um ein nýggjan møguleika – nýtt slag av máli – ið skal leggjast fyri nevndina. Fyri sjúkrahúsverkið og Sernám er umsitingarliga avleiðingin, at tey skulu gjøgnumføra eygleiðing og kanning av børnum innan 2 mánaðir frá avgerðini hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Mett verður tó, at talan bert verður um fá mál árliga.

Broytingin í uppskotinum í mun til kanning av málinum eigur ikki at hava stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndarumsitingina, tí kanningin skal í dag eisini fevna um tey viðurskifti, ið eru viðkomandi. Tó má roknast við, at nøkur mál í dag ikki hava øll viðurskifti við, sum tey skulu hava við eftir broytingina. Broytingin hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Tilmæltu broytingarnar í mun til ætlanina fyri barnið og familjuna, koma bert at hava smávegis umsitingarligar broytingar fyri barnaverndartænasturnar, tí broytingin í stóran mun bert lýsir tað, sum er galdandi í dag. Tó setir uppskotið størri krøv til ætlanina í mun til skifti til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Ríkisumboðið, tí hann fær fleiri mál um barnagjald at taka støðu til. Tann 31.12.2010 vóru 44 børn til fosturs. Í 2010 vóru 19 børn á stovni í Føroyum ella uttanlands. Verður útgangsstøðið tikið í hesum tølum, merkir hetta, at Ríkisumboðið tað fyrsta árið, skal taka avgerð ella broyta avgerð í mun til 126 foreldur, um øll børnini hava tvey foreldur. Eftirfylgjandi ár verður tað oftast bert í mun til tey børn, ið verða umsorganaryvirtikin, at Ríkisumboðið skal taka avgerð um barnagjald. Í 2010 vóru 15 nýggj mál um umsorganaryvirtøku løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Árini 2007 – 2009 var talið av nýggjum málum um umsorganaryvirtøku ávikavist 22, 23 og 25.

Umsitingarligu avleiðingarnar fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eru, at nevndin ikki longur skal taka avgerð um uppalingarískoyti. Harafturímóti skal Høvuðsbarnaverndarnevndin boða Almannastovuni frá, tá eitt barn verður sett heiman. Skyldan at boða Almannastovuni frá, hevur áður ligið hjá barnaverndartænastunum. Samanumtikið verður mett, at uppskotið ikki fær umsitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Mett verður, at broytingin hevur við sær, at barnaverndartænasturnar fáa minni umsiting. Hetta tí at tað krevur minni umsiting at senda áheitan til Ríkisumboðið um at fáa barnagjald ásett, enn tað krevur at kanna fíggjarligu viðurskiftini hjá familjuni, ið barnaverndartænasturnar ikki longur skulu gera.

Almannastovan umsitur í dag skipanina við at innheinta ikki goldið barnagjald, og innheintar hesi umvegis TAKS. Almannastovan umsitur eisini stuðul til uppihaldspening. Mett verður, at tað ikki krevur serliga umsiting hjá Almannastovuni, at umsita innheintan av ikki goldnum barnapeningi og stuðul til uppihaldspening, tí hesi skulu gerast eftir teimum reglum og skipanum, sum eru galdandi í mun til onnur barnagjøld, ið ikki verða goldin. Tó má roknast við, at talan verður um fleiri mál hjá Almannastovuni at umsita, í mun til innheintan av barnagjaldi og stuðul til uppihaldspening.

**Avleiðingar fyri vinnuna**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**

Mett verður, at uppskotið ikki viðførir avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur avleiðingar fyri tey øki, sum í dag hava sjálvstøðuga barnaverndarnevnd, men sum skulu samstarva við aðrar kommunur um felags barnaverndarnevnd.

Tvær barnaverndarnevndir eru í Suðuroy. Eftir uppskotinum kann bert ein barnaverndarnevnd verða í Suðuroy.

Fuglafjarðar- og Eystur kommunur hava hvør sína barnaverndarnevnd. Tær mugu frameftir samstarva við Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur um felags barnaverndarnevnd.

Viðareiðis-, Húsar- og Hvannasunds kommunur hava longu gjørt avtalu við Klaksvíkar kommunu soleiðis, at allar kommunur í Norðoyggjum frameftir koma at samstarva um felags barnaverndarnevnd

Íbúgvaratalið í Eiðis- og Sunda kommunum er tilsamans undir 3.000, og mugu hesar tískil samstarva við annað samstarvsøkið, ið er landafrøðiliga ella samferðsluliga samfelt við Eiðis- og Sunda kommunur. Sandoy kann ikki framyvir hava sjálvstøðuga barnaverndarnevnd og má samstarva við Streymoynna, ið er einasta økið, ið er landafrøðiliga ella samferðsluliga samfelt við Sandoynna.

**Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Mett verður, at uppskotið viðførir jaligar avleiðingar fyri tey børn, ið eru fevnd av barnaverndarlógini, tí tey verða fevnd av lógini í longri tíð – inntil tey fylla 23 ár – og tískil fáa betri hjálp, enn tey fáa eftir galdandi lóg. Mett verður, at fleiri fara at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru.

At heimildin fyri at taka avgerð um varandi umsorganaryvirtøku verður víðkað, verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri barnið, tí tað kemur at vita, hvar tað skal vera í longri tíð, og sleppur undan at standa í tí støðu at ivast í, hvar tað skal vera, hvørja ferð málið verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til eftirmetingar. Samstundis verður mett, at broytingin ikki hevur stórvegis avleiðingar fyri foreldrini, tí tey altíð kunnu fáa málið um varandi umsorganaryvirtøku uppafturtikið, um umstøðurnar hjá teimum eru munandi broyttar.

At áseta, at ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku bert skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina 2. hvørt ár eftir 1. árið, ger, at børnini hava ein longri tíðarhorisont at fyrihalda seg til, tí tey vita, hvar tey skulu vera 2 ár í senn. Samstundis styrkir tað rættartrygdina hjá foreldrunum, tí tað bert í heilt serligum førum verður møguligt hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini at áseta longri freist fyri eftirmeting av málinum.

Harafturat styrkir tað rættartrygdina hjá børnum, at barnið ikki kann setast heim aftur uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Hetta er við til at tryggja, at børn ikki verða sett heim aftur, um viðurskiftini í heiminum ikki eru í lagi, ella um barnið ikki ynskir at fara heim aftur.

Heimildin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini at innskriva barn á stovn ella innleggja á sjúkrahús til eygleiðing og kanning, er eitt inntriv í foreldramyndugleikan hjá foreldrum og avgerðarrættin hjá børnum, ið hava fylt 15 ár. Endamálið við heimildini er at fáa avklárað, um vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og harvið um grundarlag er fyri at seta barnið heiman. Vísir tað seg, at vandi er fyri barnsins heilsu og menning, kann barnið setast heiman og koma í rætta viðgerð. Við tað at eygleiðingin og kanningin skulu vera liðug 2 mánaðir eftir avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, hevur hetta væntandi við sær, at hesi børn koma í rætta viðgerð skjótari enn í dag.

***Avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar***

Mett verður, at uppskotið ikki viðførir umsitingarligar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

Talva: Yvirlit yvir avleiðingar

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Ummæli**

Fíggjarmálaráðið, Innlendismálaráðið, Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Barnaverndarstovan, Høvuðsbarnaverndarnevndin, Almannastovan, Nærverkið, Fosturforeldraskipanin, Føroya Lærarafelag, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Ríkisumboðið og Prestafelagið hava latið viðmerkingar til lógaruppskotið.

Fleiri viðmerkingar eru til lógaruppskotið, tó eru ikki allar viðmerkingarnar gingnar á møti.

***Samstarvsøkini***

Kommunufeløgini meta ikki, at barnaverndarøkini skulu víðkast til 3000 íbúgvar, fyrr enn støða er tikin til, hvussu kommunali bygnaðurin kemur at síggja út í framtíðini.

Kommunudeildin í Innlendismálaráðnum mælir í fyrstu atløgu frá at áseta eitt minstamark við 3000 íbúgvum, og mælir í aðru atløgu til, heldur at nýta eina orðing sum t.d. samsvarandi § 3, stk. 1, nr. 4 í løgtingslóg nr. 12 frá 2007: “at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar”. Er hetta ikki nøktandi, átti møguleikin, fyri at áseta sjálvi samstørvini í lógini, at verið umhugsaður.

Kommunudeildin í Innlendismálaráðnum sigur seg skilja trupulleikan, "men saknar í tí sambandi, at spurningurin, um uppgávan kanska er ov stór at leggja til kommunur, verður viðgjørdur. Í teimum seinastu kommunuálitunum hevur verið víst til meginregluna um, at kommunur eiga at fáa álagt uppgávur, sum tær kunnu fyrisita sjálvstøðugt og tillaga eftir staðbundna tørvinum."

Almannamálaráðið metir tað ikki bera til at leggja barnaverndarøkið aftur til landið at umsita. Kommunurnar hava megnað væl at tikið ímóti og lyft barnaverndarøkið, og barnaverndarøkið er eitt øki, ið greitt eigur at liggja nærri borgaranum - um ikki ov nær, og skal ikki tengjast at landafrøðiliga landkortinum í Føroyum.

Tískil hevur Almannamálaráðið partvíst gingið áheitanini frá Kommunudeildini á møti, soleiðis at samstørv um barnaverndarøkið frameftir skulu skipast sambært § 2 í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv. Hetta við atliti til, eins og Kommunudeildin vísir á, at økið er stórt at umsita. Umframt, at barnaverndarøkið eisini er viðkvæmt og trupult at umsita og tí krevur neyðugu førleikarnar.

***Tagnarskylda og fráboðanarskylda***

Prestafelagið vísir á, at kallið sum prestur er sermerkt. Lógin um barnavernd eigur at taka atlit til kallið og prestatænastuna, ið inniber skerpaða tagnarskyldu. Hetta tekur Almannamálaráðið ikki undir við, og vísir til, at Ankestyrelsen í Danmark heldur ikki er av somu áskoðan í mun til danskar prestar.

Lærarafelagið ynskir áseting um, at Barnaverndartænasturnar skulu boða fráboðara frá, hvørt tiltøk eru sett í verk í familjuni. Eisini vil Lærarafelagið hava lærarahópin betur útbúnan til at taka sær av barnaverndarmálum og ynskir, at krøv um undirvísing verða formliga staðfest í lógini.

Áheitanina frá Lærararfelagnum um, at Barnaverndartænasturnar skulu boða frá, hvørt fyriskipan er sett í verk, er tikin til eftirtektar, hóast arbeiðsbólkurin hevur mælt frá hesum.

Almannamálaráðið viðurkennir, at lærarar og onnur starvsfólk hava tørv á undirvísing í at handfara barnaverndarmál, men tekur ikki undir við, at krøv um undirvísing til eitt nú lærarar formliga skulu staðfestast í barnaverndarlógini.

***Ymiskar broytingar***

Kommunufeløgini og Barnaverndarstovan meta, at Almannastovan eigur at halda útreiðsluna til dagpening, meðan familja er innskrivað til familjuviðgerð (§ 15 a, stk. 3) Útreiðslan kann sammetast við eina almannahending, ið gevur rætt til forsorgarhjálp. Almannamálaráðið metir, at hetta skal viðgerast í samband við ta broyting, sum skal gerast í sambandi við, at eitt greiðari ábyrgdarbýtið millum land og kommunurnar innan økið, herundir um at leggja stovnarnar til kommunurnar at umsita, verður skipað.

Kommunufeløgini og Barnaverndarstovan taka ikki undir við heimildini til mekling í § 8, stk. 4. Hildið verður ikki, at mekling skal verða ein møguleiki, áðrenn ein fyriskipan er sett í verk. Almannamálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar, og er heimildin til mekling tikin úr lógaruppskotinum.

Kommunufeløgini og Barnaverndarstovan meta, at heimild eigur at setast í lógina til at tvangsviðgera kvinnu, sum er við barn, og sum rúsar seg. Hetta er ikki tikið til eftirtektar, og

ongin heimild er tikin við í uppskotið. Hetta er m.a. grundað á, at ongin viðgerðarstovnur í Føroyum er lukkaður ella serliga ætlaður júst hesum kvinnum, og kunnu tær altíð fara av verandi stovnum. Almannamálaráðið metir, at gongda leiðin hinvegin er, at kvinna, sum er við barn, og ið rúsar seg, eigur at motiverast til at fara í viðgerð.

Fosturforeldrafelagið mælir til broyting í § 17 soleiðis, at myndugleikar eiga at koma upp í mál, tá vandi eru fyri, at børn vera skadd av at vera verandi í heiminum, og ikki sum orðingin sigur **"munandi"** skadd. Almannamálaráðið hevur broytt § 17 samsvarandi.

***Førleikakrøv***

Fosturforeldrafelagið metir ikki, at skipanin við fasta persóninum, sum barnið kann venda sær til, tá barn verður sett heiman, er nóg góð. Skipanini eigur at tryggja øllum børnum, sum verða sett heiman, óheftan fakliga kompetentan kontaktpersón burturav.

Almannamálaráðið skilir sjónarmið Fosturforeldrafelagsins, men metir, at eitt tílíkt uppskot eigur at verða viðgjørt nærri, áðrenn tað verður ásett í lógini.

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar eftirlýsir m.a. førleikakrøv í ávísum førum. Her verður víst til, at fakligu krøvini til barnaverndarumsitingarnar og barnaverndarnevndirnar verða herd sambært uppskotinum.

***Fíggjarligar avleiðingar***

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at uppskotið gevur Løgtinginum haldgott grundarlag at taka støðu, við tað at fíggjarligu avleiðingarnar ikki eru lýstar.

Høvuðsbarnaverndarnevndin og Innlendismálaráðið vísa eisini á, at uppskotið fer at hava fíggjarligar avleiðingar, umframt at kommunufeløgini og Barnaverndarstovan eisini vísa á, at eitt nú eftirvernd (hækka aldurin til 23 ár) fer at føra til øktar útreiðslur fyri kommunurnar, og vilja kommunurnar hava hesar útreiðslur endurgoldnar. Almannamálaráðið metir, at málið eigur at verið tikið upp sjálvstøðugt í sambandi við at skapa greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Í framhaldi av hesum ber ikki til hjá Almannamálaráðnum at lýsa fíggjarligu avleiðingarnar meira nágreinað, tí broytingarnar í stóran mun eru tengdar at, hvussu kommunurnar vilja skipa arbeiðið samsvarandi broytingunum í lógini.

Í mun til uppgávuna hjá Børn og Ung í sambandi við eygleiðing og útgreining, so verður mett, at hvørt barn kostar 1 mió. kr. Skal nýggjur stovnur setast á stovn til endamálið, verður mett, at hesin fer at kosta 4-5 mió. kr. árliga.

Uppskotið metir ikki um øktar útreiðslur hjá ávikavist Sernám og Psykiatriska Deplinum, og hvørki Mentamálaráðið ella Heilsumálaráðið hava latið viðmerkingar til lógaruppskotið.

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

***Viðv. § 1, nr. 1***

Aldursmarkið verður broytt soleiðis, at børn og ung upp til 23 ár eru fevnd av lógini.

***Viðv. § 1, nr. 2***

Greinin ásetur, at fyri ung í aldrinum 18 til og við 22 ár kunnu bert tær fyriskipanir, ið eru ásettar í § 15 b, setast í verk. Treytin fyri at seta fyriskipanir í verk fyri 18 – 23 ára gomul er, at tann ungi er undir barnavernd, áðrenn viðkomandi gerst 18 ár.

Sí eisini viðmerkingarnar til. § 1, nr. 19, viðvíkjandi § 15 b.

***Viðv. § 1, nr. 3***

Broytingin hevur við sær, at kommunalu samstørvini skulu skipast í økir samsvarandi § 2 í løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv.

Broytingin hevur onga ávirkan á tvørfakliga samstarvið eftir § 10.

***Viðv. § 1, nr. 4***

Fakligu krøvini til formannin og meirilutan av limunum í barnaverndarnevndini verða skerpað soleiðis, at hesi skulu hava í minsta lagi viðkomandi miðallanga útbúgving. Viðkomandi *førleiki* er ikki nøktandi, talan skal vera um *útbúgving*.

Við *viðkomandi útbúgving* er at skilja útbúgving, ið gevur førleikar í mun til at arbeiða við og taka avgerð í barnaverndarmálum. Útbúgving innan almanna-, heilsu- ella skúlaverk, eitt nú sosialráðgevi, sjúkrarøktarfrøðingur, sálarfrøðingur, lækni, ergoterapeutur, fysioterapeutur, námsfrøðingur og lærari mugu metast at vera viðkomandi. Eisini útbúgvingar innan samfelagsfrøði kunnu vera viðkomandi, eitt nú løgfrøði. Vinnuyrkiligar útbúgvingar, eitt nú handverkari ella bókhaldari, er ikki at skilja sum viðkomandi útbúgving.

Við *miðallanga* útbúgving er at skilja útbúgving á bachelor støði. Kravið er í minsta lagi miðallanga útbúgving. Útbúgvingin kann tískil gott vera á hægri støði, eitt nú á kanditat støði.

Kommunurnar eiga, í sambandi við at barnaverndarnevndin verður mannað, at taka atlit til, at limirnir hava ymiskar viðkomandi fakligar førleikar, soleiðis at nevndin er so tvørfaklig sum gjørligt.

Treytirnar um, at limirnir í barnaverndarnevndini skulu vera samvitskusamir og álítandi borgarar verður strikað, tí mett verður, at tað er sera trupult hjá eftirlitsmyndugleikanum at meta um, nær treytirnar eru loknar. Treytirnar eru ein partur av persónligu eginleikunum, ið kommunan eigur at taka atlit til, tá limirnir verða valdir.

Eisini treytin um, at limirnir skulu hava góðan kunnleika til børn, verður strikað. Tað er trupult at meta um, nær treytin er lokin, bæði hjá kommununi og hjá eftirlitsmyndugleikanum. Við at áseta krav um viðkomandi miðallanga útbúgving, verður tryggjað, at formaðurin og meirilutin av limunum, hava neyðugan fakligan kunnleika til at arbeiða við barnaverndarmálum.

Um eitt samstarvsøki ikki megnar at manna barnaverndarnevndina og -umsitingina við limum og starvsfólki, ið lúka ásettu fakligu krøvini, má samstarvsøkið samstarva við annað øki sambært § 4, stk. 1, sbrt. stk. 5, um felags barnaverndarnevnd, ið hevur barnaverndarnevnd og -umsiting, ið lúka fakligu krøvini.

***Viðv. § 1, nr. 5***

Samstarvsøkini skulu skipast sambært § 2 í løgtingslóg um sjálvbodna kommunusamanlegging og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur (løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007). Samstarvsøkini vera sostatt:

1) Norðoyggjar, t.e. Fugloyar-, Viðareiðis-, Hvannasunds-, Klaksvíkar-, Kunoyar- og Húsa kommunur

2) Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar-, Eystur-, Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur

3) Sundalagið, t.e. Eiðis- og Sunda kommunur.

4) Streymoy, t.e. Tórshavnar- og møguliga Vestmanna- og Kvívíkar kommunur

5) Vágar, t.e. Vága- og Sørvágs kommunur, umframt møguliga Vestmanna- og Kvívíkar kommunur

6) Sandoy, t.e. Skopunar-,Sands-, Skálavíkar-, Húsavíkar- og Skúvoyar kommunur.

7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar-, Tvøroyrar-, Fámjins-, Hovs-, Porkeris-, Vágs- og Sumbiar kommunur

Vestmanna og Kvívíkar kommunur hava saman valfrælsi sambært lógini um kommunu samanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

Henda broytingin førir ítøkiliga við sær, at tríggjar færri barnaverndarnevndir verða. Í dag eru 2 barnaverndartænastur í Suðuroy. Frameftir verður ein barnaverndartænasta í Suðuroy.

Fuglafjarðar kommuna og Eysturkommuna hava í dag egna barnaverndartænastu. Frameftir skulu hesar samstarva við Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur um felags barnaverndartænastu.

Samstarvsøkir kunnu samstarva við annað ella onnur samstarvsøki um felags barnaverndarnevnd. Mælt verður til, at Sandoyggin og møguliga Sundalagið samstarva við annað øki, um felags barnaverndarnevnd.

Við *landafrøðiliga samfeld* er at skilja ein natúrlig landafrøðilig eind – kommunur, ið eru landafrøðiliga samanhangandi.

Við *samferðsluliga samfeld* er at skilja økir, ið eru ein samanhangandi eind samferðsluliga. Tað skal ikki vera neyðugt at fara gjøgnum eina aðra eind fyri at koma til annan part av eindini. Borgararnir skulu hava rímiliga atgongd til tænastuna, og tískil skal verða dagligt alment ferðasamband millum økini. Fyrilit eiga at verða tikin fyri ferðamynstrinum hjá borgarunum.

***Viðv. § 1, nr. 6***

Fakligu krøvini til starvsfólk í barnaverndarumsitingini verða skerpað. Øll starvsfólkini í umsitingini skulu hava eina miðallanga viðkomandi útbúgving.

Við *viðkomandi útbúgving* er at skilja útbúgving, ið gevur førleikar í mun til at arbeiða við og taka avgerð í barnaverndarmálum. Útbúgving innan almanna-, heilsu- ella skúlaverk, eitt nú sosialráðgevi, sjúkrarøktarfrøðingur, sálarfrøðingur, lækni, ergoterapeutur, fysioterapeutur, námsfrøðingur og lærari, mugu metast at vera viðkomandi. Eisini útbúgvingar innan samfelagsfrøði kunnu vera viðkomandi, eitt nú løgfrøði. Vinnuyrkiligar útbúgvingar, eitt nú handverkari ella bókhaldari, er ikki at skilja sum viðkomandi útbúgving.

Við *miðallanga* útbúgving er at skilja útbúgving á bachelor støði. Kravið er í minsta lagi miðallanga útbúgving. Útbúgvingin kann tískil vera á hægri støði, eitt nú á kanditat støði.

Starvsfólkini skulu framvegis, um tey ikki hava kunnleika til fyrisitingarrætt, fáa eina eftirútbúgving í hesum, áðrenn tey byrja í starvinum – sí § 5, stk. 3 í lógini. Harafturat skulu øll starvsfólkini hava frálæru í handfaring av persónsupplýsingum, sambært persónsupplýsingarlógini.

Treytirnar um, at starvsfólkini skulu vera samvitskusamir og álítandi borgarar, verður strikað, tí mett verður, at tað er sera trupult hjá eftirlitsmyndugleikanum at meta um, nær treytirnar eru loknar. Treytirnar eru ein partur av persónligu eginleikunum, ið kommunan eigur at taka atlit til, tá starvsfólkini verða sett.

Eisini treytin um, at starvsfólkini skulu hava góðan kunnleika til børn, verður strikað. Tað er trupult at meta um, nær treytin er lokin, bæði hjá kommununi og hjá eftirlitsmyndugleikanum. Við at áseta krav um viðkomandi miðallanga útbúgving, verður tryggjað, at starvsfólkið hevur neyðugan fakligan kunnleika til at arbeiða við barnaverndarmálum.

***Viðv. § 1, nr. 7***
Barnaverndarøkini gerast størri, og tískil kann vegurin frá borgaranum til barnaverndarumsitingina gerast langur. Í samstarvsøkjum kann teinurin, ið ferðast skal, gerast serliga langur. Til tess at tryggja, at tænastan er atkomulig hjá borgaranum, verður ásett, at tað skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarumsitingini umvegis telefon í arbeiðstíð. Tá tørvur er á at møtast persónliga, eigur barnaverndarumsitingin í størst møguligan mun at møta borgaranum í hansara lokala øki. Allar kommunur í einum samstarvsøki eiga at lata høli vera til taks til barnaverndarumsitingina at brúka til hetta endamál.

***Viðv. § 1, nr. 8***
Ásetingin í § 15, stk. 1, nr. 11 í galdandi lóg, verður flutt til § 8, og verður sett inn sum stykki 2.

Talan er um eina almenna fyribyrgjandi skipan, og ikki um eina ítøkiliga fyribyrgjandi fyriskipan í mun til tað einstaka barnið. Tískil verður ásetingin flutt frá § 15, stk. 1, ið hevur ásetingar um ítøkiligar fyribyrgjandi fyriskipanir, til § 8, ið er um almennu skyldurnar hjá barnaverndartænastuni.

Eingin innihaldslig broyting er gjørd uttan tann, at umframt foreldur er eisini nevndur. Serligu viðmerkingarnar til § 15, stk. 1, nr. 11 í løgtingslóg nr. 18 frá 8 mars 2005 (løgtingsmál 10/2004) eru tískil framvegis galdandi.

Tað er tó umráðandi, at barnaverndartænastan hevur í huga, hvørja ábyrgd barnaverndartænastan hevur eftir § 8, stk. 1. Ábyrgdin eftir stk. 1 fellur ikki burtur, hóast barnaverndarnevndin fær upplýsingarnar í sambandi við t.d. eina telefonsamrøðu eftir (nýggju) § 8, stk. 2. Barnaverndarnevndin skal sostatt í hvørjum einstøkum føri meta um, hvørt ein fyriskipan eigur at setast í verk.

***Viðv. § 1, nr. 9***
Konsekvensbroyting. § 15, stk. 4 verður strikað. § 15 a kemur í staðin.

***Viðv. § 1, nr. 10***
Konsekvensbroyting. § 15, stk. 4 verður strikað. Í staðin kemur § 15 a. Harafturat verður § 15 b sett inn í lógina sum nýggj grein, og er tað Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um fyriskipanir eftir § 15 b, stk. 3.

***Viðv. § 1, nr. 11***
Uppgávurnar hjá Barnaverndarstovu Føroya broytast, soleiðis at Barnaverndarstovan ikki longur veitir samdøgursstovnum ráðgeving og vegleiðing.

Hóast broytingina eiga tilboð á samdøgursstovnunum at tillagast tørvinum í samráð við Barnaverndarstovuna.

***Viðv. § 1, nr. 12***
Fráboðanarskyldan hjá fakfólki verður skerpað.

*Fakfólk* eru øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera. Tað er t.d. lærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, tannlæknar, læknar, sálarfrøðingar, fyrisoterapeutar, ergoterapeutar, sosialráðgevar, dagstovnaleiðarar, dagrøktarar og prestar. Hugtakið fakfólk fevnir eisini um onnur, ið hava við børn at gera í teirra starvi, t.d. privat, ið veita sosiala tænastu ella ráðgeving í atferðartrupulleikum, uppaling og umstøðum hjá børnum.

Fráboðanarskyldan hjá fakfólki verður skerpað soleiðis, at hesi eisini hava skyldu til at fráboða barnaverndartænastuni, um so er, at tey hava orsøk til at halda, at tørvur er á hjálp eftir barnaverndarlógini.

Sostatt hava fakfólk skyldu til at fráboða:
- um tey hava *kunnleika* til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini,
- um tey hava *orsøk til at halda,* at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

Við *orsøk til at halda* er at skilja, at viðkomandi fakfólk hevur ein grundaðan illgruna ella varhuga um, at viðurskifti eru, sum gera, at barnið hevur tørv á hjálp – at barnið livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða heilsu ella menning barnsins.

Við *grundaðan illgruna ella varhuga* er at skilja, at tekin eru, sum benda á viðurskiftini, t.d. at barnið ikki hevur mat við í skúla, at barnið tykist órøkt ella óttafult v.m. Tað er tó altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri, ið ger av, um stig skulu takast, og hvørji.

Fráboðanarskyldan áliggur frá tí, at fakfólkið fær *kunnleika* til ella *orsøk til at halda*. Skyldan áliggur tó bert, um viðkomandi *í starvi sínum* hevur fingið kunnleika til viðurskiftini, ella orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini. Fráboðanarskyldan áliggur, uttan mun til, hvør orsøkin er til, at tørvur er á hjálp eftir lógini. Tað er ikki ein fortreyt, at barnið faktisk fer at fáa hjálp eftir lógini.

Fakfólk eiga tó at umhugsa, hvørt trupulleikin kann loysast innan egið virkisøkið, áðrenn tað verður fráboðað barnaverndartænastuni. Er ein lærari t.d. stúrin um eitt barn, tí tað ikki trívist, og tað vísir seg, at orsøkin er, at barnið verður happað í skúlanum, og lærarin annars ikki er stúrin í mun til, hvussu barnið hevur tað heima, eigur lærarin at taka trupulleikan upp og loysa hann í skúlahøpi. Fakfólk kunnu altíð venda sær til barnaverndartænastuna og tosa um barnið ónavngivið, um viðkomandi ivast í, hvørt viðkomandi eigur at fráboða ella ikki.

Áðrenn fakfólk fráboða, eiga tey at umhugsa, hvørt tey skulu kunna tann, ið hevur foreldramyndugleikan ella dagligu umsorganina við barninum, um, at viðkomandi ætlar at fráboða, og royna at fáa samtykki til hetta. Meginreglan er, at tey eiga at kunna, men talan kann vera um mál, har tað ikki skal kunnast, áðrenn tað verður fráboðað, eitt nú um illgruni er um, at tann, ið hevur foreldramyndugleikan ella dagligu umsorganina við barninum, fremur kynsligan ágang ella harðskap mótvegis barninum. Í málum har fakfólkið kunnar tann, ið hevur foreldramyndugleikan ella dagligu umsorganina fyri barninum, men samtykki ikki fæst til at fráboða, hevur fakfólkið skyldu til at fráboða uttan samtykki, um viðkomandi fakfólk framvegis er stúrið fyri barninum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki kemur fram um ásetingar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

Fráboðanarskyldan er persónlig. Tað einstaka fakfólkið hevur ábyrgdina av at reagera og handla upp á egna stúran.

***Viðv. § 1, nr. 13***
Eftir nýggju orðingini skal fráboðast til barnaverndartænastuna, um ein fær kunnleika til, at eitt barn:

- verður vanrøkt,
- verður meinsla,
- verður misnýtt,
- livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning.

*Vanrøkt* er at skilja sum likamlig vanrøkt, vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit, vanrøkt í sambandi við skúlagongd og kenslulig/sálarlig vanrøkt.

*Meinsla* er at skilja sum likamligur ella kensluligur/sálarligur harðskapur.

*Misnýtt* er at skilja sum blóðskemd, siðamisbrot ella annar kynsligur ágangur.

Fráboðanarskyldan áliggur øllum privatpersónum/borgarum. Skyldan áliggur t.d. grannum, skyldfólki, vinum, foreldrum til eitt annað barn í barnagarðinum og einum ítróttavenjara.

Eingi formkrøv eru til fráboðanina. Fráboðarin kann fráboða skrivliga ella munnliga.

***Viðv. § 1, nr. 14***
Tað verður greitt ásett, at øll hava fráboðanarskyldu í mun til kvinnu, ið er við barn. Fráboðanarskyldan hjá fakfólki, t.e. teimum, ið hava við kvinnur, ið eru við barn at gera, t.d. lækni og jarðarmóðir, er skerpað sbr. stk. 1, meðan privatpersónar/borgarar hava vanliga fráboðanarskyldu sbr. stk. 2.

Broytingin hevur við sær, at tað skal fráboðast barnaverndartænastuni, um mett verður, at kvinna, ið er við barn hevur tørv á hjálp eftir barnaverndarlógini, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.

Endamálið við fráboðanini er at tryggja, at kvinna fær hjálp, um vandi er fyri, at tað ófødda barnið tekur skaða. Harumframt fyri at tryggja, at kvinnan og barnið, eftir at tað er føtt, kunnu fáa neyðugan stuðul.

Viðmerkingarnar til greinina í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (løgtingsmál nr. 10/2004) eru annars framvegis galdandi við omanfyrinevndu tillagingum.

***Viðv. § 1, nr. 15***
Afturboðanin til fráboðara hevur til endamáls at vátta fyri viðkomandi starvsfólki, at Barnaverndartænastan viðger málið og gevur samstundis viðkomandi starvsfólki møguleikan fyri í sínum arbeiði at taka hædd fyri, at kanning ella fyriskipan er sett í verk sambært barnaverndarlógini.

Barnaverndartænastan kann ikki afturboða til onnur enn starvsfólk, sum í sínum starvi hava fingið kunnleika til ella illgruna um viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir barnaverndarlógini.

Heimildin gevur undantak til reglurnar í persónsupplýsingarlógini um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar.

Barnaverndartænastan kann bert afturboða, hvørt kanning ella fyriskipan sambært barnaverndarlógini er sett í verk, og kann bert afturboða í mun til tann, sum fráboðanin viðvíkur. Afturboðanin fevnir eitt nú ikki um foreldur ella systkin.

Afturboðanin fevnir ikki um, hvør kanning ella hvør fyriskipan er sett í verk.

Barnaverndartænastan skal boða frá, hvørt kanning ella fyriskipan er sett í verk sambært barnaverndarlógini, tá fráboðari biður um at fáa hesar upplýsingar. Tó kann Barnaverndartænastan lata vera við at afturboða til fráboðara, tá Barnaverndartænastan hevur ávísa orsøk at halda, at viðkomandi starvsfólk ikki kann fara um upplýsingarnar á skilagóðan hátt, t.d. í førum, tá talan kann vera um, at starvsfólk fráboða fyri at gera seg inn á ávísan persón/ar, ella tá Barnaverndartænastan er vitandi um, at familjan hevur heilt ávísa orsøk til, at upplýsingar um teirra persónligu viðurskifti verða vard.

Kemur fráboðanin umvegis fleiri persónar, eitt nú skúlastjóra sum fráboðar vegna ein lærara, kann Barnaverndartænastan afturboða um, hvørt kanning ella fyriskipan sambært barnaverndarlógini er sett í verk, til hvønn einstakan av hesum.

***Viðv. § 1, nr. 16***
Ásetingin heimilar barnaverndarnevndini at veita heilt ella partvíst sosialt frípláss á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi, uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá foreldrunum/verjanum, um treytirnar fyri sosialum fríplássi eru loknar.

*Sosialt pláss* er at skilja sum pláss, ið verður latið barni, tá ið tað av sosialum orsøkum verður mett neyðugt, fyri at tryggja barnsins heilsu og menning, at barnið er á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi. Talan skal vera um ein sosialan trupulleika, antin hjá barninum sjálvum ella hjá onkrum í familjuni, ið ávirkar barnsins heilsu og menning. Trupulleikin kann t.d. vísa seg við, at:

1. barnið hevur eina atferð, ið vísir tørv á menning, sum krevur serligan stuðul. Tað kann vera í mun til atferð, kensluliga ella sosialt,

2. barnið ikki megnar at hava sosialt samband við onnur, og heimið ikki í nóg stóran mun megnar at sosialisera barnið,

3. barnið ikki verður nóg væl stimbrað í heiminum, t.d. tí foreldrini hava menningartarn, eru evnaveik ella sálarsjúk, ella hava aðrar sosialar trupulleikar.

Sí eisini avgerð hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum, mál nr. 06-01-142-19, ið greinar, nær sosialt frípláss kann veitast.

*Heilt ella partvís* sosialt pláss er at skilja sum, at barnið er á dagstovninum/-røktini heilan dag ella partar av degnum.

*Frípláss* er at skilja sum pláss á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi, uttan gjald, tað er uttan, at foreldur/verji rinda fyri plássið. Barnaverndartænastan rindar fyri plássið eftir § 15, stk. 3, sbr. § 68.

Ásetingin er viðkomandi í teimum førum, har barnið ikki er á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi. Vísir tað seg, at eitt barn, ið verður ansað heima, av sosialum orsøkum hevur tørv á menning, kann sosialt frípláss á dagstovni/-røkt veitast, um mett verður, at hetta er neyðugt fyri at tryggja barnsins heilsu og menning, her í millum at tað hjálpir upp á trupulleikan hjá barninum, um arbeitt verður við barninum námsfrøðiliga. Sosialt frípláss kann eisini vera viðkomandi í sambandi við kanning av málinum eftir § 45, har sosialt frípláss kann veitast eitt avmarkað tíðarskeið við tí endamálið at fáa staðfest, um trupulleikar eru.

Hetta merkir samstundis, at um eitt barn gongur á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi, innskrivað eftir vanligu reglunum, og tað vísir seg, at barnið hevur sosialar trupulleikar, broytist plássið ikki til eitt sosialt pláss. Tað er, at barnið heldur fram í "vanliga" plássinum, og fíggjarligt frípláss verður framvegis latið, um treytirnar fyri hesum eru loknar. Taka foreldrini barnið úr dagstovninum/-røktini, og verður mett, at barnið av sosialum orsøkum eigur at vera á dagstovni/-røkt, kann sosialt frípláss veitast, soleiðis at barnið kann halda fram á dagstovninum/-røktini.

Tá avgerð er tikin um at seta barn á dagstovn, í dagrøkt ella líknandi vegna sosialar trupulleikar, skal barnaverndarnevndin kunna starvsfólkið á dagstovninum/-røktini um, hvørjar trupulleikar barnið hevur, og hvørji fyrilit starvsfólkini skulu taka fyri hesum barninum soleiðis, at

uppihaldið á dagstovninum/-røktini kann hjálpa barninum á besta hátt. Tað áliggur barnaverndarumsitingini at gera eina ætlan fyri barnið og familjuna eftir § 47, og í samstarvi við dagstovnin/-røktina at gera eina virkisætlan fyri barnið. Verður barn sett á stovn í sambandi við kanning av málinum eftir § 45, eigur dagstovnurin/-røktin at fáa sína uppgávu greitt lýsta. Starvsfólki á dagstovninum/-røktini hevur tagnarskyldu viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum barnaverndarnevndin/-tænastan gevur teimum.

Um tað ikki er møguligt at fáa samstarv við og samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, til at seta fyriskipanina í verk, kann barnaverndarnevndin, sambært § 15, stk. 2, taka avgerð um, at barn skal á dagstovn, í dagrøkt ella líknandi uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Ein slík avgerð kann tó bert takast, um tað má metast at vera av munandi týdningi fyri barnsins serliga tørv á stuðli, at barnið er á dagstovni/-røkt, og tá ið endamálið við fyriskipanini verður mett at kunna røkkast uttan samtykki. Barnaverndarnevndin kann tó ikki taka barnið úr heiminum við tvingsli, fyri at koyra tað á dagstovn, í dagrøkt ella líknandi.

Um eitt barn á dagstovni ella í dagrøkt verður uppsagt orsakað av eftirstøðu, kann barnaverndarnevndin ikki stuðla foreldrunum/verjanum í at rinda eftirstøðuna fyri "vanliga" plássið. Eftirstøðan eigur at viðgerast eftir vanligu reglunum um eftirgevan av skuld til kommunurnar. Hinvegin kann barnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal hava sosialt frípláss, um treytirnar fyri hesum eru loknar. Avgerðin um sosialt frípláss er bert galdandi frameftir, og ávirkar tískil ikki møguliga eftirstøðu fyri foreldragjald.

*Dagstovnur, dagrøkt ella líknandi* er at skilja sum tey kommunalu tilboð, ið eru fevnd av dagstovnalógini, løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, við seinni broytingum.

***Viðv. § 1, nr. 17***
§ 15, stk. 1, nr. 11 verður broytt. Galdandi orðingin verður flutt til § 8, og sett inn sum stk. 2.

Nýggja orðingin í § 15, stk. 1, nr. 11 heimilar barnaverndarnevndini at veita einum barnið, ið er 16 ár ella eldri, stuðul at búgva í egnum kamari ella egnari íbúð.

Fyriskipan um egið kamar ella egna íbúð kann ikki koma í staðin fyri umsorganaryvirtøku. Eru treytirnar fyri umsorganaryvirtøku loknar, skal fyriskipan um umsorganaryvirtøku setast í verk.

Heimildin kann bert brúkast í mun til barn, ið hevur fylt 16 ár. Harafturat skal barnið vera væl fyri og væl ment. Krav er tó ikki um, at barnið skal vera heilt sjálvbjargið.

Heimildin er serliga ætlað, men ikki avmarkað til, at brúka í sambandi við, at barnið nemur sær útbúgving – teoretiska ella praktiska. Í hesum sambandi kann barnaverndarnevndin veita barninum stuðul t.d. at búgva í egnum kamari á einum næmingaheimi.

Fyriskipan um egið kamar ella egna íbúð er ikki umsorganaryvirtøka. Tað er tískil framvegis foreldrini, ið hava umsorganarábyrgdina fyri barninum. Tað er tí ein treyt, at foreldrini og barnið skilja hetta og samtykkja í, at fyriskipanin verður sett í verk, sbr. § 15, stk. 2. Barnaverndarnevndin eigur tó altíð samstundis, sum fyriskipanin verður sett í verk, í minsta lagi,

at veita barninum ein stuðulspersón, ið kann hjálpa, stuðla og hava eftirlit við barninum. Hetta fyri at tryggja at barnið hevur tað gott, er trygt og fær tað hjálp og stuðul, tað hevur tørv á.

Kommunan heldur útreiðslurnar, ið standast av fyriskipanini sambært § 15, stk. 3.

***Viðv. § 1, nr. 18***
§ 15, stk. 4 verður strikað. Í staðin verður nýggj áseting um familjuviðgerð v.m. á stovni hjá landinum sett inn sum § 15 a – sí viðmerkingar viðv. § 1, nr. 20.

***Viðv. § 1, nr. 19***
§ 15 a, stk. 1 heimilar Høvuðsbarnaverndarnevndini at innskriva familju á stovn hjá landinum til familjuviðgerð.

Familjuviðgerð á stovni hjá landinum er viðkomandi í teimum førum, har familjuviðgerð eftir § 15, stk. 1, nr. 2 ikki verður mett at kunna hjálpa í mun til ítøkiliga tørvin hjá familjuni.

Endamálið við at innskriva familju til familjuviðgerð er at styrkja foreldraførleikan hjá foreldrunum við ráðgeving og vegleiðing, og veita familjuviðgerð annars í mun til tørvin hjá familjuni.

Í sambandi við familjuviðgerðina verður eisini mett um foreldraførleikan hjá foreldrunum.

Familjur eiga bert at innskrivast til samdøgurstilboð, um so er, at endamálið ikki kann røkkast við at innskriva til dagtilboð. Samdøgurstilboðið er serliga ætlað í teimum førum, tá ið barnaverndartænastan ivast í, um foreldrini hava nøktandi førleika til at taka sær av sínum barni/børnum.

Ein familja kann verða innskriva til familjuviðgerð, meðan barnið er sett heiman, um tað verður mett at hava týdning fyri, at barnið kann koma heim aftur.

Mál eftir § 15 a, stk. 1 skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8, sbr. § 11, stk. 3.

Familjuviðgerð eftir § 15, stk. 1, nr. 2 er hereftir at skilja sum familjuviðgerð sum dagtilboð, ið familjan fær frá øðrum enn stovni hjá landinum. Slík familjuviðgerð fer fram í heiminum ella úti í økinum.

Viðmerkingarnar til § 15, stk. 1, nr. 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (løgtingsmál nr. 10/2004), eru annars, við omanfyri nevndu tillaging, framvegis galdandi; eitt nú er eingin broyting í mun til, hvør er fevndur at hugtakinum "*familja*", ella hvør viðgerð ella líknandi stuðul kann veitast eftir ásetingini.

§ 15 a, stk. 2 heimilar Høvuðsbarnaverndarnevndini at innskriva barn á dagstovn hjá landinum, um barnið ikki kann integrerast á kommunalum dagstovni.

Mál eftir § 15 a, stk. 2 skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8, sbr. § 11, stk. 3.

Viðmerkingar til § 15, stk. 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (løgtingsmál nr. 10/2004), viðvíkjandi tilboði á dagstovni hjá landinum eru framvegis galdandi.

§ 15 a, stk. 3 samsvarar við galdandi § 15, stk. 3. Ætlanin er ikki at gera nakra broyting í mun til hvør heldur útreiðslurnar, ið standast av familjuviðgerð á samdøgursstovni hjá landinum og tilboði á dagstovni fyri børn hjá landinum. Tískil verður ásett í § 15 a, stk. 3, at barnaverndarnevndin kann veita fíggjarligan stuðul til útreiðslurnar, sum standast av fyriskipanum eftir § 15 a, stk. 1 og 2, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. Ein broyting verður tó gjørd soleiðis, at tá foreldur verða innskrivað til familjuviðgerð, skulu tey altíð hava endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tó í mesta lagi við eini upphædd samsvarandi við hægstu sjúkradagpeningaveiting. Hetta merkir fyri tað fyrsta, at endurgjald bert skal veitast, um talan er um mista inntøku. Fyri tað næsta verður endurgjald latið við í mesta lagi eini upphædd samsvarandi við sjúkradagpeningaveiting. Hava foreldrini ikki mist inntøku orsakað av innskrivingini, verður einki endurgjald veitt.

§ 15 b er bert galdandi fyri ung í aldrinum 18 til og við 22 ár. Greinin ásetir, hvørjar fyriskipanir kunnu setast í verk fyri ung í aldrinum 18 – 23 ár, og hvørjar treytirnar eru. Talan er um fyriskipanir, ið stuðla tí unga í at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru og lætta skiftið hjá tí unga til eina vaksnamannatilveru – sokallað eftirvernd. Endamálið við at seta fyriskipaninir í verk eftir § 15 b er at stuðla tí unga í at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Hetta kann t.d. vera at hjálpa tí unga at koma inn á arbeiðsmarknaðin, at stuðla tí unga at nema sær útbúgving ella megna skiftið til eina sjálvstøðuga íbúð.

Hesar treytir skulu vera loknar, fyri at fyriskipanir kunnu setast í verk:

1) at tann ungi gevur sítt samtykki til, at fyriskipanin verður sett í verk,
2) at tann ungi er í eini fyriskipan eftir barnaverndarlógini, tá viðkomandi fyllir 18 ár, sbr. § 2, stk. 2 og
3) at tað verður mett at vera av munandi týdningi fyri tann unga, at fyriskipanin verður sett í verk, fyri at tann ungi skal megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru.

Eru treytirnar loknar, skal ein ella fleiri av fyriskipanunum í stk. 2 og 3 setast í verk. Fyriskipanin skal viðvirka til eitt gott skifti til eina vaksnamannatilveru.

Tað er ikki ein treyt fyri at seta fyriskipan í verk, at tann ungi kemur at klára seg sjálvan uttan nakra hjálp yvirhøvur, tá viðkomandi gerst 23 ár. Um tað verður mett, at tann ungi fær gagn av eini fyriskipan, og at fyriskipanin er viðvirkandi til, at tann ungi kemur at hava tørv á minni hjálp í framtíðini, t.d. kann klára seg við stuðulsfólki nakrar tímar um vikuna, kann fyriskipanin eisini setast í verk. Er viðkomandi har aftur í móti so illa fyri, at viðkomandi hóast fyriskipanina, altíð kemur at hava tørv á umfatandi hjálp, t.d. tørv á plássi á bústovni, er einki endamál við at seta fyriskipanina í verk, og tann ungi eigur tískil at fáa tilboð eftir forsorgarlógini.

Barnaverndarnevndin kann sambært stk. 2 seta eina ella fleiri av fyriskipanunum í § 15, stk. 1, nr. 1, 5, 6, 9, 10 ella 11 í verk fyri tann unga, um treytirnar eru loknar. Barnaverndarnevndin kann antin taka avgerð um, at ein fyriskipan, ið er sett í verk áðrenn fylta 18. árið skal halda

fram, ella at onnur fyriskipan skal setast í verk. Tað, sum er avgerðandi, er, at fyriskipanin tænir endamálinum – at stuðla tí unga í at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru.

Fyriskipanirnar skulu leggjast til rættis soleiðis, at støðið verður tikið í møguleikum og evnum hjá tí unga at megna eina sjálvstøðuga tilveru. Hetta hevur við sær, at dentur skal leggjast á útbúgving, arbeiði og onnur viðkomandi viðurskifti, so sum sjálvstøðuga íbúð og fíggjarviðurskifti.

Er talan um ung, ið eru umsorganaryvirtikin, tá tey fylla 18 ár, kann fyriskipan eisini setast í verk eftir stk. 3. Tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um fyriskipanir eftir stk. 3.

Er tann ungi settur á stovn ella til fosturs, kann henda fyriskipan halda fram. Tað, sum er avgerandi fyri, at ein slík fyriskipan kann halda fram, er, at tann ungi mennist í fyriskipanini og væntast framvegis at mennast í mun til endamálið – at tann ungi skal kunna megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru.

Møguleiki er eisini fyri at seta tann unga í stovnslíknandi fyriskipan eftir § 33, stk. 1, t.e. í íbúð við tilknýttum vegleiðara, varda íbúð e.l. Í løtuni er tó eingin slík stovnslíknandi fyriskipan.

Harafturat kann útslúsing frá stovni ella fosturheimi setast í verk, tá tann ungi gerst 18 ár. Við útslúsing er at skilja eitt tilboð til tann unga um at flyta út av stovninum, ella út frá fosturforeldrunum so líðandi. Harafturat at tann ungi yvir eitt tíðarskeið kann koma aftur á stovnin ella til fosturforeldrini í t.d. 1 – 2 dagar í senn. Talan kann t.d. vera um ung, ið ikki hava eina familju at venda sær til at fáa stuðul. Endamálið við útslúsingini er at geva tí unga møguleika fyri at halda seg upp at stovninum ella fosturforeldrunum, har onnur ung kunnu halda seg at teirra foreldur.

Um mett verður, at tann ungi kann klára seg so mikið væl, at viðkomandi ikki hevur tørv á eini fyriskipan eftir stk. 3, kann barnaverndarnevndin í staðin seta fyriskipan í verk eftir stk. 2 í sambandi við, at tann ungi verður útskrivaður av stovninum ella fosturheiminum.

Ein fyriskipan eftir stk. 2 og 3 skal halda uppat, tá endamálið er rokkið, ella tá hon ikki longur tænir endamálinum, og í seinasta lagi tá tann ungi fyllir 23 ár, tó soleiðis at ein fyriskipan eftir stk. 3, nr. 1 í seinasta lagi skal halda uppat, tá tann ungi fyllir 21 ár. Hetta merkir, at ein fyriskipan ikki kann halda fram:

- um tann ungi ikki longur hevur tørv á fyriskipanini fyri at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru,
- um fyriskipanin ikki longur hjálpir og mennir tann unga í mun til at megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru, ella
- tann ungi fyllir 23 ár, tó í mun til fyriskipan eftir stk. 3, nr. 1, 21 ár.

Um ein fyriskipan ikki longur tænir endamálinum, er møguligt at seta aðra fyriskipan í verk. Tað er eisini møguligt at seta aðra fyriskipan í verk fyri ein ungan, ið hevur verið í longdari fyriskipan eftir stk. 3, nr. 1, tá viðkomandi fyllir 21 ár.

***Viðv. § 1, nr. 20***
Barnaverndarnevndin hevur skyldu til at hava eftirlit við, hvussu bæði barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk. Í hesum sambandi hevur barnaverndarnevndin skyldu til at meta um, hvørt tann ella tær fyriskipanir, ið eru settar í verk, virka eftir ætlan ella eiga at broytast, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Endamálið við eftirlitinum er at tryggja, at fyriskipanin alla tíðina gagnar barninum og foreldrunum, og stuðlar uppundir at náa teimum málum, ið eru sett, og at tryggja, at fyriskipanin ikki heldur fram, um endamálið er rokkið, ella fyriskipanin ikki longur tænir endamálinum.

Barnaverndarnevndin hevur skyldu til at hava eftirlit so ofta, tað er neyðugt í tí einstaka málinum. Málini eru ymisk, og tí er eisini ymiskt, hvussu ofta tørvur er á at hava eftirlit. § 16 ásetur minsta mark fyri, hvussu ofta eftirlit skal fremjast.

Metingin av fyriskipanini er tætt knýtt at ætlanini við fyriskipanini. Metast skal um, hvørt fyriskipanin stuðlar uppundir at náa teimum málum, ið eru sett fyri barnið og foreldrini og framvegis tænir endamálinum. Eisini skal metast um, hvørt ætlanin eftir § 47 skal broytast, her í millum, um nøkur av teimum viðurskiftum, ið higartil ikki hava verið viðkomandi, nú eru viðkomandi, og tí eiga at takast við í ætlanina. Dømi um hetta er, at tá eitt barn kemur í skúlaaldur, er viðkomandi at hugsa um skúlaviðurskiftini. Eitt annað dømi er, at tað er viðkomandi at hugsa um skiftið til vaksnamannatilveruna, tá barnið er 15 ár.

Tað kunnu vera mál, har tað ikki er neyðugt at broyta ætlanina, men bert at tillaga fyriskipanina. Hetta er m.a. galdandi, tá sama fyriskipan heldur fram við sama endamáli, men við nýggjum persónum, t.d. nýggjan persónligan ráðgeva til barnið. Er hinvegin talan um, at barnið skal í nýggja viðgerð, ella nærri kanningar skulu gerast av barninum, skal ætlanin eftir § 47 broytast í mun til hetta.

Fyrsta eftirlitið, t.e. fyrsta eftirmetingin av fyriskipanini og ætlanini, skal barnaverndarnevndin gera í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at fyriskipanin er sett í verk. Hetta fyri at tryggja, at hædd verður tikin fyri møguligum nýggjum viðurskiftum, sum vísa seg eftir, at ein fyriskipan er sett í verk. Talan kann til dømis vera um, at tað kemur fram, eftir at eitt barn er sett heiman, at barnið hevur verið úti fyri kynsligum ágangi og ikki bert er vanrøkt, sum barnaverndartænastan annars helt, og barnið tí kann hava tørv á hjálp frá sálarfrøðingi. Harafturat kann hetta eftirlitið vera við til at fyribyrgja, at ein fyriskipan miseydnast. Tillagingartíðin (fyrsta tíðin eftir at ein fyriskipan er sett í verk) er oftast tann truplasta, serliga tá eitt barn verður sett heiman. Eftirlitið kann hava hetta í huga og gáa eftir, um tekin eru um, at fyriskipanin kann miseydnast, eitt nú um foreldrini og barnið eru nøgd við fyriskipanina, og møguliga seta inn við stuðlandi fyriskipanum, ið kunnu hjálpa foreldrunum og barninum í tillagingartíðini, og harvið fyribyrgja, at fyriskipanin miseydnast.

Aftaná tað fyrsta eftirlitið skal barnaverndarnevndin í minsta lagi 6. hvønn mánað meta um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan ella skal broytast, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Hetta merkir, at barnaverndarnevndin hevur skyldu til at hava eftirlit við einum máli í minsta lagi tvær ferðir árliga. Barnaverndarnevndin hevur tó skyldu til at hava eftirlit oftari, um tørvur er á tí í tí einstaka málinum.

Eftirlitið kann fremjast á ymiskan hátt, alt eftir hvør fyriskipan er sett í verk. Eitt nú kann samskiftið við ymisku partarnar í málinum í nøkrum málum vera nøktandi fyri at kunna meta um, hvørt fyriskipanin ella ætlanin eigur at broytast. Í øðrum málum kann vera neyðugt at gera nærri kanningar av barninum ella foreldrunum. Í mun til barn, ið er sett heiman, skulu samtalur verða við barnið, sí serligu viðmerkingarnar til stk. 3.

Eftirlit skal gerast í mun til bæði barnið og foreldrini. Hetta merkir, at barnaverndarnevndin skal meta um fyriskipanir, sum eru settar í verk, fyri bæði barnið og foreldrini, eins og barnaverndarnevndin skal meta um, hvørt ætlanin fyri barnið og foreldrini eftir § 47, skal broytast. Er t.d. eingin fyriskipan ella ætlan fyri foreldrini, men bert fyri barnið, skal barnaverndarnevndin meta um, hvørt tað nú er neyðugt at seta fyriskipan í verk fyri foreldrini, og gera eina ætlan fyri tey eftir § 47.

Hugtakið "sett heiman" fevnir um børn á stovni ella fosturheimi í sambandi við umsorganaryvirtøku eftir § 19, umframt ung, ið eru í longdari fyriskipan/eftirvernd eftir § 15 b stk. 3.

Í mun til barn, ið er sett heiman, skal eftirlitið fevna um minst tvær samtalur árliga við barnið. Samtalan skal í størst møguligan mun gerast, uttan at starvsfólk á stovninum ella fosturforeldur eru hjástødd. Hetta fyri at tryggja, at barnið kann tosa frítt um, hvussu tað hevur tað, og um tað eru trupulleikar. Um barnið ynskir tað, kann barnið hava ein hjáseta ella annan persón við til samtaluna, t.d. fasta persónin eftir § 19, stk. 4.

Endamálið við samtaluni er at fáa innlit í, hvussu barnið trívist í fyriskipanini, og hoyra barnsins egnu meting av umstøðunum/viðurskiftunum. Harafturat er endamálið at tryggja, at málini, ið eru sett fyri barnið, verða nádd, og at endamálið við at seta barnið heiman kann røkkast í tí ítøkiligu fyriskipanini.

Samtalan við barnið er ein liður í eftirlitinum, og er ein partur av grundarlagnum fyri metingini av fyriskipanini og ætlanini eftir § 47, sum eru umrødd í serligu viðmerkingunum til § 47.

Í mun til barn, ið er sett heiman, kann eisini vísast til § 24 - § 24 e.

Tað er barnaverndarnevndin, ið hevur ábyrgdina av at seta nýggjar fyriskipanir í verk, og at ætlanin eftir § 47 verður broytt, um eftirlitið vísir, at tørvur er á hesum.

Vísandi til § 8, stk. 2, nú § 8, stk. 4, skal barnaverndartænastan stremba eftir at fáa samstarv í lag við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan. Hetta er eisini galdandi, tá talan er um at broyta eina fyriskipan ella ætlan eftir § 47. Harafturat skal barnaverndartænastan, sambært § 44, hoyra barnið og leggja dent á barnsins ummæli.

Sambært § 46 skulu upplýsingar í størst møguligan mun innheintast í samstarvi við tann, ið málið snýr seg um. Metir barnaverndarumsitingin, at tað gongur ov nógv út yvir barnið at samstarva við foreldrini, skulu upplýsingarnar fáast til vega uttan hetta samstarv. Barnsins áhugamál skulu altíð takast fram um alt annað.

***Viðv. § 1, nr. 21***
§ 16 a er flutt frá § 16, stk. 3 og 4. Eingin innihaldslig broyting er gjørd.

***Viðv. § 1, nr. 22***

Orðið "munandi" verður strikað, við tað at allur ivi eigur at koma barninum til góðar. Metast skal ikki um, hvussu nógv barnið verður skatt, t.v.s. hvørt talan er um munandi skaða.

***Viðv. § 1, nr. 23***
Broytingin hevur við sær, at ein bráðfeingis avgerð kann standa við í fýra mánaðir. Hetta merkir, at barnaverndartænastan hevur upp til tríggjar mánaðir at kanna málið í, áðrenn tilmælið skal sendast Høvuðsbarnaverndarnevndini sambært § 55, stk. 2.

***Viðv. § 1, nr. 24***
Ásetingin áleggur barnaverndartænastuni at hjálpa barninum við at finna ein persón, ið kann tilnevnast barninum sum fastur persónur eftir § 15, stk. 9, meðan barnið er sett heiman. Talan er um ein rætt hjá barninum. Hetta merkir, at barnið ikki hevur skyldu til at taka ímóti einum føstum persóni, um barnið ikki ynskir tað. Samstundis merkir hetta, at barnaverndarnevndin ikki hevur skyldu til at tilnevna barninum ein fastan persón, um tað ikki er møguligt hjá barnaverndarumsitingini at finna ein persón, sum verður mettur egnaður til at vera fastur persónur hjá barninum, ella um tann ella teir persónar, ið verða mettir egnaðir, ikki ynskja at vera fastir persónar hjá barninum.

Tað er barnið sjálvt, sum skal vísa á, hvønn persón tað ynskir tilnevndan sum fastan persón. Tí tað er umráðandi, at barnið hevur álit á og kennir seg tryggan við tann persón, ið verður tilnevndur sum fastur persónur hjá barninum. Oftast fer talan at verða um persón í barnsins nærumhvørvi, t.d. ein námsfrøðing, lærara, ein ítróttavenjara ella ein persón í næstu familju við barnið.

Um barnið vísir á ein persón, skal barnaverndartænastan meta um, hvørt viðkomandi kann stuðla barninum í at mennast, og kann virka sum eitt støðugt samband hjá barninum við ein vaksnan persón.

Um barnaverndartænastan metir, at persónurin, ið barnið hevur víst á, fer at verða hóskandi sum fastur persónur hjá barninum, setir barnaverndartænastan seg í samband við viðkomandi fyri at finna útav, um viðkomandi ynskir at vera tilnevndur fastur persónur hjá barninum. Um so er, avtala barnið, fasti persónurin og barnaverndartænastan, hvussu sambandið skal røkjast millum barnið og fasta persónin, meðan barnið er sett heiman, og vavið av hesum. Eisini eigur at avtalast nærri, hvør uppgávan er hjá fasta persóninum, soleiðis at allir partar eru samdir um uppgávuna. Tað er ikki krav um formligar fundir millum barnið og fasta persónin, ávísan funda títtleika e.l.

Høvuðsuppgávurnar hjá fasta persóninum eru tær somu, sum fasti persónurin hevur eftir § 15, stk. 9, t.e. at vera til taks, tá ið barnið hevur tørv á einum vaksnum at tosa við, at troysta barnið o.s.fr. Fasti persónurin hevur tætt og persónligt samband við barnið.

Um barnið ynskir tað, kann fasti persónurin eisini vera hjáseti hjá barninum á fundum við myndugleikarnar.

Við hjáseta er at skilja persónur, ið er stuðul fyri barnið undir málsviðgerðini, sum kann hjálpa barninum at tala sína sak, ella sum við síni hjáveru gevur barninum tryggleika. Hjáseti er ikki at skilja sum umboð eftir § 57, stk. 1 í barnaverndarlógini ella § 8 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg), og kann ikki koma í staðin fyri umboð.

Tað er altíð barnaverndartænastan, ið hevur ábyrgdina av at tryggja, at barnið skilir, hvat hendir í málinum, og hvat barnið møguliga gevur samtykki til. Henda ábyrgd kann ikki leggjast yvir á fasta persónin.

Barnaverndartænastan skal samskifta við barnið, og ikki fasta persónin, eisini tá barnið ynskir fasta persónin at verða hjáseta. Barnið má boða fasta persóninum frá, nær møguligir fundir eru v.m. Avtalast kann tó við barnið, at barnaverndartænastan, umframt at senda fundarboð til barnið, eisini sendir fundarboðini til fasta persónin.

Harafturat kann fasti persónurin, um barnið ynskir tað, verða talsmaður hjá barninum á fundum í Høvuðsbarnaverndarnevndini. Tað er barnaverndarnevndin, ið skal boða Høvuðsbarnaverndarnevndini frá, um barnið ynskir fasta persónin tilnevndan talsmann. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um at tilnevna talsmann eftir § 57, stk. 5 í barnaverndarlógini.

Um tað verður mett gagnligt, kann samvera ásetast millum barnið og fasta persónin eftir § 22, stk. 7 í barnaverndarlógini.

Fasti persónurin skal ikki setast í starv, hava løn e.l. fyri sítt arbeiði. Hetta tí at ætlanin er at styrkja barnsins samband við ein vaksnan persón, ið hevur ein persónligan áhuga og eina kensluliga skyldu mótvegis barninum. Barnaverndarnevndin kann tó endurrinda útreiðslur til t.d. telefon, ferðing o.l. eftir § 15, stk. 3, sbr. § 68, stk. 1.

***Viðv. § 1, nr. 25***
Bert ein málslig broyting. Eingin innihaldslig broyting.

***Viðv. § 1, nr. 26***
Konsekvensbroyting. Myndugleikalógin, lov nr. 277 af 30.06.1922 om umyndighed og værgemål, som senest ændret ved anordning nr. 228 af 15.03.2007, er ikki galdandi longur. Galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, ið er sett í gildi í Føroyum við anordning nr. 228 frá 15. mars 2007, verður vanliga kallað foreldramyndugleikalógin.

***Viðv. § 1, nr. 27***
Ásetingin verður orðað soleiðis, at tað greitt kemur fram, at ásetingin í § 23, stk. 1, nr. 1 ikki er avmarkað soleiðis, at tað bert er, tá foreldrini hava rúsevnismisnýtslu ella sálarlig brek, at umsorganin kann takast varandi frá foreldrunum. Treytin fyri at taka umsorganina varandi frá foreldrunum eftir § 23, stk. 1, nr. 1 er, at tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan.

Talan er sostatt um, at foreldrunum varandi vantar foreldraførleika. Orsøkin til vantandi foreldraførleikan kann m.a. vera vegna rúsevnismisnýtslu, menningartarn, sálarligar trupulleikar ella sálarlig brek, umframt aðrar trupulleikar.

Í nøkrum førum er eyðsýnt, at foreldrini vanta foreldraførleika. Í øðrum førum, kanska serliga um eingin sjúkuavgerð ella misnýtsla er staðfest, kann vera truplari at avgera, um foreldrini hava foreldraførleika, ella tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan. Í slíkum førum kann umsorganin bert takast varandi frá foreldrunum, um ein foreldraførleikakanning vísir, at foreldrini ikki hava nøktandi foreldraførleika til at hava umsorganina av barninum, og ongi útlit eru fyri, at foreldraførleikin hjá foreldrunum fer at batna. Tað eru sostatt tvær treytir, ið báðar skulu vera loknar, fyri at henda heimild kann brúkast. Fyri tað fyrsta skal ein foreldraførleikakanning staðfesta, at foreldrini ikki hava førleika til at geva barninum nøktandi umsorgan. Fyri tað næsta skal vera staðfest, at foreldraførleikin ikki kann væntast at batna. Tað skal sostatt hava verið roynt at styrkja foreldraførleikan, uttan nøktandi úrslit, t.d. við stuðli, vegleiðing, ráðgeving og/ella viðgerð.

Annars er eingin innihaldslig broyting ætlað í § 23, stk. 1, nr. 1. Serligu viðmerkingarnar til § 23, í løgtingslóg nr. 18 frá 8 mars 2005 (løgtingsmál 10/2004) eru tískil, við omanfyri nevndu tillagingum, framvegis galdandi. Sí tó eisini viðmerkingarnar viðv. § 1, nr. 29.

***Viðv. § 1, nr. 28***
Konsekvensbroyting. Broyta punktum til komma, tí fleiri nummur verða sett í stk. 1.

***Viðv. § 1, nr. 29***
Heimildin til at taka avgerð um varandi umsorganaryvirtøku verður víðkað. Eftir nr. 3 kann umsorganin takast varandi frá foreldrunum, um barnið hevur verið til fosturs í 5 ár, og hevur fingið so sterkt tilknýti til fosturfamiljuna, at tað er best fyri barnið at vera verandi hjá fosturfamiljuni. Tað merkir, at tað kann skaða heilsu og menning hjá barninum munandi, um tað verður sett heim aftur. Í mun til tilknýtið er barnsins tilknýtið til fosturforeldrini/-familjuna, samanborið við tilknýtið til biologisku foreldrini, avgerandi.

Í sambandi við varandi umsorganaryvirtøku eigur at verða mett um, hvørt tað er best fyri barnið, *at foreldramyndugleikin verður tikin frá foreldrunum*, ella at barnið verður ættleitt, og um so er, eigur møguleikin fyri hesum at kannast. Tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið leggur slík mál fyri Ríkisumboðið til støðutakan.

Reglurnar um foreldramyndugleika og ættleiðing eru í ávikavist foreldramyndugleikalógini (anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær) og ættleiðingarlógini (anordning nr. 1169 af 25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption, som ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010).

***Viðv. § 1, nr. 30***
Yvirskriftin verður broytt soleiðis, at hon lýsir innihaldið í greinini betur.

***Viðv. § 1, nr. 31 og 32***
§ 24 verður orðað umaftur og býtt upp í fleiri greinir, tí fleiri broytingar verða gjørdar.

Stk. 1 er óbroytt. Stk. 4 – 5 eru óbroytt nú § 24 c, og stk. 6 er óbroytt nú 24 e.

2. pkt. í stk. 2 verður strikað og verður í staðin sett í sjálvstøðugt stykki – nýtt stk. 3.

Stk. 3, nú § 24 b verður broytt til, at foreldur eisini skulu hava rætt til at krevja, at mál um umsorganaryvirtøku eftir § 19 verða tikin uppaftur.

§ 24, stk. 2 fevnir um støður, har barnið skal setast heim aftur, áðrenn freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er komin, tað er, um barnið skal setast heim aftur í úrtíð.

Sambært stk. 1 skal barnaverndarnevndin við jøvnum millumbilum meta um, hvørt treytirnar fyri umsorganaryvirtøku sambært § 19 framvegis eru til staðar, ella um umstøðurnar í heiminum eru broyttar soleiðis, at barnið kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum. Eru umstøðurnar broyttar soleiðis, at barnið kann setast heim aftur, skal barnaverndarnevndin leggja málið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Í mun til eftirmeting av málinum verður víst til § 16.

Tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin undir við tilmælinum frá barnaverndarnevndini, setir Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerðina um umsorganaryvirtøku sambært § 19 úr gildi. Samstundis ásetur Høvuðsbarnaverndarnevndin, sbrt. stk. § 24 d, stk. 1 og § 24 f, nær barnið skal setast heim aftur.

Skal barnið setast heim aftur í sambandi við, at freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er komin, verður víst til § 24 d, stk. 1.

Metir barnaverndarnevndin í sambandi við eftirmetingina sambært stk. 1, at fyriskipanin um umsorganaryvirtøku skal halda fram, skal barnaverndarnevndin leggja eftirmetingina av málinum fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, innan fyri freistirnar í § 24 a, stk. 1 og 2, um undantøkini í § 24 a, stk. 4 og 5 ikki eru brúkt.

Tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin undir við tilmælinum frá barnaverndarnevndini, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um, at fyriskipanin um umsorganaryvirtøku sambært § 19 skal halda fram.

§ 24 a, stk. 1 ásetur meginregluna fyri, nær ein eftirmeting av eini fyriskipan um umsorganaryvirtøku fyrstu ferð skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hevur barnið ongantíð verið sett heiman, ella er tað eitt ár ella longur síðan, at barnið hevur verið sett heiman, er meginreglan, at fyriskipanin um umsorganaryvirtøku ikki kann halda fram longur enn eitt ár, uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Hetta merkir, at barnaverndarnevndin skal leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, um barnaverndarnevndin metir, at fyriskipanin skal halda fram longur enn eitt ár frá tí, at fyriskipanin byrjaði, um ikki styttri ella longri freist er ásett eftir § 24 a, stk. 4 og 5.

§ 24 a, stk. 2 ásetur meginregluna fyri, nær ein eftirmeting av eini fyriskipan um umsorganaryvirtøku, skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, um barnið hevur verið sett heiman innan fyri tað seinasta árið. Hevur barnið verið sett heiman innan fyri tað seinasta árið, er meginreglan, at fyriskipanin um umsorganaryvirtøku ikki kann halda fram longur enn tvey ár frá tí, at Høvuðsbarnaverndarnevndin (seinast) tók avgerð. Hetta merkir, at barnaverndarnevndin skal leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri

Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, um barnaverndarnevndin metir, at fyriskipanin skal halda fram longur enn 2 ár frá tí, at Høvuðsbarnaverndarnevndin síðst tók avgerð um fyriskipanina, um ikki styttri ella longri freist er ásett eftir § 24 a, stk. 4 og 5.

Freistin í § 24 a, stk. 1 og 2 verður sambært § 24 a, stk. 3 roknað frá tí degi, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð í mun til fyriskipanina.

*Dømi 1:*
Barnið hevur ikki verið sett heiman, áðrenn Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um hetta tann 9. mars 2010. Freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini um framhaldandi umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er 1 ár frá avgerðini hjá nevndini.

*Dømi 2:*
Eftirmeting av fyriskipanini um umsorganaryvirtøku frá dømi 2 verður løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, ið tekur avgerð um framhaldandi umsorganaryvirtøku tann 5. apríl 2011. Freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini um framhaldandi umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er 2 ár frá avgerðini tann 5. apríl 2011, tí barnið hevur verið sett heiman tað seinasta árið áðrenn avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, tað er í tíðarskeiðnum 5. apríl 2010 til 5. apríl 2011.

*Dømi 3:*
Barnið varð sett heiman við samtykki við avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini tann 23. mars 2010. Samtykkið varð tikið aftur tann 23. juni 2010, og barnið varð sett heim aftur (treytirnar í § 20, stk. 2 og treytirnar fyri umsorganaryvirtøku uttan samtykki vóru ikki loknar). Barnið verður aftur sett heiman, uttan samtykki við avgerð hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini 4. oktober 2010. Freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini um framhaldandi umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina er 2 ár frá avgerðini 4. oktober 2010, tí barnið hevur verið sett heiman tað seinasta árið, tað er í tíðarskeiðnum 4. oktober 2009 til 4. oktober 2010.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann, sambært § 24 a, stk. 4, víkja frá meginreglunum í § 24 a, stk. 1 og 2 og áseta eina styttri freist fyri, nær barnaverndarnevndin skal leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan.

Hetta undantakið til freistirnar í § 24 a, stk. 1 og 2 kann brúkast, um tað er grundaður ivi um, hvørt treytirnar fyri umsorganaryvirtøku framvegis eru loknar ávikavist 1 ella 2 ár seinni. Tað skulu vera týðandi umstøður í tí ítøkiliga málinum fyri, at grundarlag er fyri at víkja frá meginreglunum. Avgerðin kann t.d. grundast á góða framgongd, ið væntast at halda fram hjá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella at kanning av foreldraførleikanum er sett í verk, við atliti at framtíðar fyribyrgjandi fyriskipanum í heiminum. Av hesum orsøkum kann tað út frá eini ítøkiligari meting verða tørvur á at meta um, hvørt treytirnar fyri umsorganaryvirtøku framvegis eru til staðar, áðrenn ávikavist 1 og 2 ár eru liðin.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann sambært § 24 a, stk. 5 víkja frá meginreglunum í § 24 a, stk. 1 og 2 og áseta eina longri freist fyri, nær barnaverndarnevndin skal leggja eina eftirmeting av fyriskipanini fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan.

Hetta undantakið til freistirnar í § 24 a, stk. 1 og 2 kann bert brúkast um so er, at barnið má væntast at skula verða sett heiman í longri tíð. Tað er ein treyt fyri at brúka ásetingina, at tey viðurskiftini, ið avgerðin er grundað á, eftir øllum líkindum mugu væntast at vara út yvir freistina eftir meginregluni á ávikavist 1 og 2 ár. Í metingini av, nær ein eftirmeting skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina aftur, skal leingjanin haldast upp ímóti meginregluni.

Spurningurin um samveru skal altíð eftirmetast í sambandi við nýggja avgerð um umsorganaryvirtøku.

Barnaverndarnevndin kann ikki sjálv taka avgerð um, at eitt barn, ið er umsorganaryvirtikið, skal setast heim aftur. Um eftirmetingin av eini fyriskipan um umsorganaryvirtøku vísir, at umstøðurnar í heiminum eru broyttar soleiðis, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, skal barnaverndarnevndin leggja eftirmetingina fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan.

Áðrenn tilmælið um at seta barnið heim aftur verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, eigur barnaverndartænastan at tryggja sær, at tað er møguligt at arbeiða við at seta barnið heim aftur. Fyri tað fyrsta skal møgulig viðgerð av foreldrum og barni vera liðug. Harafturat skal tað vera sannlíkt, at barnið og foreldrini eru ella við hjálp koma at verða før fyri at hava ein gerandisdag saman. Hetta kann m.a. gerast við at økja um samveruna og síggja, hvussu tað gongur í heiminum undir samveruni.

Tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin undir við tilmælinum frá barnaverndarnevndini, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um at seta barnið heim aftur og ásetur samstundis, nær barnið skal setast heim aftur. Sí viðmerkingarnar til § 24 f.

§ 24 d, stk. 1 fevnir um støður, tá talan um at seta barnið heim, í sambandi við at avgerðin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini rennur út, tað er í sambandi við, at freistin fyri at leggja eina eftirmeting av fyriskipanini er komin.

Er talan er um at seta barnið heim í úrtíð, verður víst til § 24 d, stk. 2.

Í mun til børn, ið eru sett á stovn, er henda áseting – § 24 d, stk. 1 – komin í staðin fyri § 35, stk. 2 í barnaverndarlógini (løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007).

Verður samtykkið til eina fyriskipan um umsorganaryvirtøku tikið aftur, og metir barnaverndarnevndin, at treytirnar í § 20, stk. 2 ikki eru loknar, og barnaverndarnevndin tískil ikki kann taka avgerð um, at barnið ikki skal setast heim aftur, hóast samtykkið er afturtikið, skal barnaverndarnevndin leggja tilmælið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan í seinasta lagi 14 dagar eftir, at samtykkið er afturtikið. Hetta er galdandi bæði í mun til samtykkið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og í mun til samtykkið frá barni, ið hevur fylt 15 ár.

Eru treytirnar fyri umsorganaryvirtøku uttan samtykki ikki loknar, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um at seta barnið heim aftur og ásetur tíðarskeið at fyrireika heimsetanina eftir § 24 g.

Í sambandi við, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um, at barnið skal setast heim aftur, ásetur nevndin, nær barnið skal setast heim aftur. Vísandi til serligu viðmerkingarnar til § 24 d, stk. 1 skal vera sannlíkt, at barnið kann setast heim aftur, áðenn avgerðum heimsetan verður tikin.

Meginreglan er, at barnið ikki verður sett heim aftur beinan vegin, men at tað verður ásett eitt tíðarskeið at fyrireika heimsetanina. Tíðarskeiðið kann vara frá fáum døgum og upp til seks mánaðir, alt eftir tørvinum í tí einstaka málinum. Tíðarskeiðið má ikki vara longri, enn endamálið við at áseta tíðarskeiðið eggjar til. Barnið skal sostatt setast heim aftur í seinasta lagi 6 mánaðir eftir avgerðina um, at barnið skal setast heim aftur.

Endamálið við at áseta eitt tíðarskeið, áðrenn barnið verður sett heim aftur, er at forða fyri, at barnið verður sett heim aftur brádliga og uttan fyrireiking, ið kann vera til skaða fyri barnsins trivnað og menning.

Í metingini av, hvussu langt tíðarskeið skal ásetast, skal takast hædd fyri, um barnið ella møgulig systkin fyrr eru sett heim aftur til foreldrini og eftirfylgjandi sett heiman aftur. Hetta eru upplýsingar, ið eru í málinum – eigur at koma fram í kanningini eftir § 45 og ætlanini eftir § 47. Eisini kann søguliga gongdin í sambandi við møguligt misbrúk og sjúku takast við í metingina av longdini av tíðarskeiðnum. Harafturat skulu viðurskiftini og tørvurin á fyriskipanum, skúlatilboði, frítíðartilboði v.m. takast við í metingina. Tað er møguligt at taka avgerð um eitt útslúsingartilboð, ið soleiðis gevur barninum møguleika fyri spakuliga at venja seg til nýggju støðuna. Harafturat eigur at takast hædd fyri, um barnið er í holt við at gera skúla ella aðra útbúgving lidna í økinum, har barnið hevur uppihald (á stovni ella í fosturheimi), og at barnið hevur tørv á tíð at fáa sagt farvæl við vinir og umsorganarpersónar.

Í tíðarskeiðnum, sum verður ásett at fyrireika heimsetanina, skal barnaverndartænastan fyrireika, at barnið verður sett heim aftur. Barnaverndartænastan skal í tí sambandi meta um, hvørt barnið ella foreldrini hava tørv á stuðli í hesum sambandi, og um nøkur fyriskipan skal setast í verk eftir § 15 ella § 15 b, og fyrireika møguliga fyriskipan. Ofta fer tað eisini at vera tørvur á, at barnaverndartænastan í samstarvi við foreldrini tryggjar, at viðurskiftini eru góð fyri barnið, aftaná at tað er sett heim aftur, t.d. við at tryggja, at barnið hevur hóskandi frítíðar, skúla- og/ella dagstovnatilboð beinanvegin, eftir tað er komið heim.

Barnaverndartænastan skal eisini meta um, hvørt tíðarskeiðið, áðrenn barnið verður sett heim aftur, skal brúkast til at meta um, hvørt málið skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina í mun til umsorganaryvirtøku uttan samtykki (bert viðkomandi, tá samtykki er afturtikið), ella um varandi umsorganaryvirtøku eftir § 23, t.d. vísandi til, at barnið hevur verið til fosturs í longri tíð, og tískil hevur fingið størri tilknýti til fosturfamiljuna enn til biologisku familjuna. Hesin møguleiki eigur tó bert at verða brúktur í serligum førum, tí barnaverndartænastan í sambandi við eftirmetingina av málinum eftir § 24, stk. 1 og § 16 eigur at hava umhugsað møguleikan fyri umsorganaryvirtøku uttan samtykki (uttan mun til at samtykki er givið) og fyri varandi umsorganaryvirtøku.

Høvuðsbarnaverndarnevndin kann í serligum førum taka avgerð um, at barnið skal setast heim aftur beinan vegin. Hetta er eitt undantak til meginregluna um, at eitt tíðarskeið skal ásetast,

áðrenn barnið verður sett heim aftur. Undantakið kann brúkast í serligum førum, t.d. um fosturforeldrini flyta ella siga avtaluna upp, samstundis sum barnið av øðrum orsøkum skal setast heim aftur. Í slíkum førum er tað oftast betri fyri barnið at koma heim beinanvegin, heldur enn at skula setast til fostur hjá nýggjari fosturfamilju í eitt styttri tíðarskeið. Tað kann eisini vera, at barnið skal setast heim, beint áðrenn skúlin byrjar, og tað verður mett at vera betri fyri barnið at koma heim beinanvegin og byrja í skúlanum samstundis, sum hini børnini byrja í skúlanum. Harafturat kann tað verða føri, har tað ikki er gagnligt/hóskandi at áseta eitt tíðarskeið, eitt nú um barnið hevur verið sett heiman í stutta tíð, ella um barnið hevur havt uppihald í nærumhvørvinum, meðan tað hevur verið sett heiman og samstundis hevur havt tætt samband við foreldrini.

Tíðarskeiðið frá tí, avgerð er tikin um, at barnið skal setast heim aftur, og til barnið skal setast heim aftur, er at meta sum framhald av fyriskipanini um umsorganaryvirtøku, sum barnið er í, tá avgerðin er tikin. Tað merkir, at barnið er umsorganaryvirtikið, inntil tað verður sett heim aftur.

Í § 24 g verður greitt ásett, nær ein fyriskipan skal halda uppat. Ein fyriskipan, sum er sett í verk, kann ikki halda fram, um:

1. endamálið við fyriskipanini er rokkið, tað er, at málið er nátt, sum fyriskipanin skuldi náa sambært ætlanini eftir § 47,

2. fyriskipanin ikki longur tænir endamálinum, tað merkir, at barnið – ella foreldrini um fyriskipanin er sett í verk fyri tey – ikki (longur) mennist, sum ætlað, og endamálið tí ikki kann náast í fyriskipanini, ella

3. barnið fyllir 18 ár, tað er, at ein fyriskipan, sum er sett í verk fyri eitt barn, skal halda uppat, tá barnið fyllir 18 ár. Í hesum sambandi kann fyriskipan tó setast í verk eftir § 15 b.

***Viðv. § 1, nr. 33***
§ 27, stk. 5 verður broytt soleiðis, at næstringar ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, kunnu góðkennast sum fosturforeldur, um tey í tí ítøkiliga førinum vera mett egnað í mun til tað ávísa barnið.

Ítøkilig góðkenning merkir, at fosturforeldrini bert eru góðkend til tað ávísa barnið. Hetta merkir samstundis, at fosturforeldrini ikki kunnu hava onnur børn til fosturs og tískil ikki standa tøk at taka ímóti øðrum børnum eftir § 26, stk. 3. Fosturforeldrini kunnu tó fáa ítøkiliga góðkenning fyri fleiri børn samstundis, t.d. systkin.

Ein ítøkilig góðkenning verður grundað á eina kanning av, um familjan verður mett egnað í mun til tørvin hjá tí ávísa barninum, sbr. stk. 4. Í sambandi við eina ítøkiliga góðkenning skal dentur leggjast á at kanna og meta um barnsins samband og tilknýti við familjuna. Familjan skal hava neyðuga orku til at geva barninum tann stuðul og umsorgan, sum barnið hevur tørv á, møguliga saman við fyriskipan eftir § 15, sbr. § 27, stk. 7.

***Viðv. § 1, nr. 34***
§ 27, stk. 6 verður broytt soleiðis, at tað nú er eitt krav, at fosturforeldur luttaka á einum skeiði, ið fyrireikar tey til at verða fosturforeldur. Fosturforeldur skulu helst luttaka á skeiði áðrenn tey fáa barnið, og annars so skjótt tilber, eftir at tey hava fingið barnið. Kravið er galdandi í mun til øll fosturforeldur, eisini næstringar og onnur við tøttum sambandi við barnið.

Skeiðið skal geva fosturforeldrum neyðuga kunning og vitan í mun til tað at vera fosturforeldur. Skeiðið skal eisini geva teimum vitan um, hvørja uppgávu tey taka upp á seg, og geva teimum amboð til at loysa uppgávuna.

Tað áliggur Fosturforeldraskipanini at skipa fyri skeiðinum og at tryggja, at fosturforeldrini lutaka á skeiði.

***Viðv. § 1, nr. 35 og 36***
Greinin verður broytt soleiðis, at hon er í samsvari við galdandi siðvenju. Eftir galdandi siðvenju er tað avvarðandi barnaverndartænasta, ið rindar fosturforeldrunum samsýning, uppihaldsútreiðslur og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum. Tað er tó Fosturforeldraskipanin, ið ásetur hvørja samsýning fosturforeldrini skulu hava sambært stk. 1. Samsýningin verður ásett sambært kunngerð um samsýning til fosturforeldur (kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006).

***Viðv. § 1, nr. 37***
§ 33, stk. 3 verður strikað. Hetta hevur við sær, at tað ikki longur krevur loyvi frá landsstýrismanninum at seta barn á stovn uttanlands. Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur endaligu heimildina til at seta barn á stovn uttanlands – sí eisini viðmerkingarnar viðv. § 1, nr. 39.

Í staðin verður í stk. 3 ásett, svarandi til galdandi siðvenju, at landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar fyri familjur. Einasti samdøgursstovnur fyri familjur í løtuni er Familjudepilin, ið er ein landsstovnur.

***Viðv. § 1, nr. 38***
Broytingin í § 33, stk. 4, sum verður stk. 5, hevur við sær, at landsstýrismaðurin eisini kann geva øðrum loyvi til at stovnseta og reka stovnar fyri familjur.

***Viðv. § 1, nr. 39***
Ásett verður, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið innskrivar børn á samdøgursstovn. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um, hvørt barnið skal innskrivast á ávísan samdøgursstovn, eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini. Barnaverndarnevndin leggur tilmælið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, har mælt verður til ávísan samdøgursstovn. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur antin undir við tilmælinum, ella ikki.

Høvuðsbarnaverndarnevndin av ger, hvønn samdøgursstovn barnið skal innskrivast á.

Í stk. 3 fær Høvuðsbarnaverndarnevndin heimild til at innskriva børn á stovn uttanlands. Samstundis verður galdandi § 33, stk. 3 strikað. Tískil er ikki longur neyðugt hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini at fáa loyvi frá landsstýrismanninum at seta børn á stovn

uttanlands. Henda heimild eigur bert at vera brúkt í serligum førum, og bert tá einki nøktandi pláss er á samdøgursstovni í Føroyum.

Hugtakið "*nøktandi pláss á samdøgursstovni*" skal síggjast í samanhangi við heimildina og ábyrgdina hjá landsstýrismanninum eftir § 33, stk. 1.

§ 33, stk. 1 ásetur, at landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar og aðrar samdøgursfyriskipanir, við tilknýttum sertænastum, fyri børn, ið eru fevnd av barnaverndarlógini.

Sambært viðmerkingunum til greinina, eru samdøgurstovnarnir, ið landsstýrismaðurin kann stovnseta og reka sambært § 33, stk. 1, stovnar, ið eru ætlaðir børnum og ungum, sum hava serligan tørv á røkt og viðgerð v.m. vegna sosialar trupulleikar. Talan er sostatt um viðgerðarstovnar, ið hava til endamáls at geva børnum og ungum røkt, umsorgan og sosialpedagogiska viðgerð.

Hugtakið *pláss á samdøgursstovni* skal skiljast sum pláss á stovni, ið er stovnsettur við heimild í § 33, stk. 1. Við *nøktandi* skal skiljast, at neyðugi fakligi førleikin er til staðar á stovninum at veita ta røkt, umsorgan og sosialpedagogisku viðgerð, sum barnið hevur tørv á.

Sostatt skal hugtakið "*einki nøktandi pláss á samdøgursstovni*" skiljast soleiðis, at stovnar í Føroyum, sum eru stovnsettir eftir § 33, stk. 1, ikki hava neyðuga fakliga førleikan at veita barninum ta røkt, umsorgan og sosialpedagogisku viðgerð, sum viðkomandi barn hevur tørv á.

Heimildin í § 35, stk. 3 fevnir um, og er avmarkað til, at Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um, at barn kann setast á stovn uttanlands við tí endamáli, at barnið fær ta røkt, umsorgan og sosialpedagogisku viðgerð, sum viðkomandi barn hevur tørv á, um samdøgursstovnar í Føroyum ikki hava neyðuga fakliga førleikan til at veita hesa. Stovnurin uttanlands kemur í staðin fyri stovnin í Føroyum.

Heimildin fevnir sostatt ikki um at seta børn á stovn uttanlands við tí grundgeving, at nøktandi skúlatilboð ella nøktandi psykiatrisk viðgerð ikki er í Føroyum. Heimildin og ábyrgdin av at skipa skúlatilboð og psykiatrisk tilboð er hjá landsstýrismanninum í ávikavist mentamálum og heilsumálum. Um barnið hevur tørv á slíkum tilboðum, má barnaverndarnevndin venda sær til viðkomandi myndugleika hesum viðvíkjandi.

Hóast markamót er millum samdøgursstovnar og ávikavist skúlatilboð og psykiatrisk tilboð, er hetta ikki til hindurs fyri, at samstarv er ímillum hesi. Í hesum sambandi kann vísast á tvørfakliga samstarvið eftir § 10 í barnaverndarlógini, og at samskipanin av ymiskum tilboðum kann vera ein partur av ætlanini fyri barnið, sum barnaverndarumsitingin ger eftir § 47 í barnaverndarlógini.

Um barnið verður sett á samdøgursstovn uttanlands eftir § 35, stk. 3, kann uppihaldið, hóast omanfyri nevndu avmarkingar í heimildini, ikki avmarkast til røkt, umsorgan og sosialpedagogiska viðgerð, men má eisini, um neyðugt, umfata skúlatilboð og psykiatriskt tilboð.

Stk. 4 er ein víðkan/skerping av galdandi § 35, stk. 2, ið ásetti, at barn bert kundi útskrivast av stovni fyri tíð við góðkenning frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Við broytingini kann eitt barn ikki útskrivast av stovni uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Sostatt krevur tað altíð eina avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndin at útskrivað eitt barn av stovni. Í sambandi við, at barnið skal útskrivast av stovni, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir reglunum í § 24.

***Viðv. § 1, nr. 40***

Høvuðsbarnaverndarnevndin fær heimild til at seta børn á stovn ella innleggja tey á sjúkrahús, bæði somatiska og psykiatriska deild, til eygleiðing og kanning uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og barni, ið er fylt 15 ár.

Henda heimild er ætlað at brúka, tá viðurskiftini verða mett at vera so álvarsom, at tað er neyðugt at kanna barnið fyri at fáa avklárað, um tað er eyðsýndur vandi fyri álvarsligum skaða á barnsins heilsu og menning. Heimildin kann sostatt, um neyðugt, brúkast til at fáa støðuna hjá barninum lýsta og harvið sum grundarlag fyri, um barnið skal setast heiman ella ikki. Heimildin skal ikki brúkast, um so er, at tað longu er grundarlag fyri at seta barnið heiman.

Heimildin fevnir bara um eygleiðing og kanning av barninum, t.d. at fáa barnið útgreinað. Heimildin fevnir ikki um viðgerð. Læknakanning og viðgerð er fevnd av § 18 í barnaverndarlógini.

Møguleiki er fyri at lata eygleiðing og kanning gjøgnumføra antin ambulant ella við innskriving/innlegging, soleiðis at barnið skal vera har, inntil eygleiðingin og kanningin er liðug. Í hvørjum einstøkum førum skal støða takast til, hvussu eygleiðingin og kanningin skal gjøgnumførast. Er møguligt at gjøgnumføra hetta ambulant, skal hesin háttur veljast, tí hetta má metast sum eitt minni inntriv enn innskriving/innlegging. Verður mett, at eygleiðingin og kanningin ikki kann gjøgnumførast ambulant, t.d. orsakað av at foreldrini ikki vilja stuðla uppundir, at hetta verður gjøgnumført, kann avgerð takast um, at barnið skal innskrivast/innleggjast.

Í mun til eygleiðing og kanning á sjúkrahúsi krevur hetta, eftir vanligum mannagongdum, undirtøku frá yvirlæknanum á deildini.

Børn hava sambært psykiatrilógini (anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om tvang i psykiatrien) sjálvstøðug rættindi. Setur barn ella ungur seg ímóti at leggjast inn á psykiatrisku deild, skulu mannagongdirnar í psykiatrilógini nýtast umframt.

Sernám, ið hevur ábyrgd av einum parti av útgreining av børnum, hevur ongan samdøgursstovn, har børn kunnu innskrivast. Tískil er neyðugt, at barnið, um eygleiðingin og kanningin ikki kann gerast ambulant, verður innskrivað á samdøgursstovn hjá Børn & Ung (Almannastovan/Nærverkið), men tað er tó Sernám, ið hevur skyldu til og ábyrgdina av at gera neyðugu eygleiðingarnar og kanningarnar. Hesar mugu so gerast í samstarvi við samdøgursstovnin.

§ 22 um samveru er eisini galdandi í sambandi við, at ein kanning verður gjøgnumførd við, at barnið verður innskrivað á stovn ella innlagt á sjúkrahús. Sostatt er møguligt at avmarka samveruna ella seta treytir fyri samveruna í tíðarskeiðnum, barnið er innskrivað/innlagt til kanningar, um treytirnar annars eru loknar.

Kanningin skal vera liðug í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur tikið avgerð um, at kanningin skal gerast/gjøgnumførast.

Tá kanningin er liðug, tað er, tá tað ikki longur er neyðugt, at barnið er á stovninum ella sjúkrahúsinum fyri at gjøgnumføra kanningina, skal barnið heim aftur til foreldrini. Hetta merkir, at heimild er ikki til at lata barnið verða verandi á stovninum ella sjúkrahúsinum, meðan barnaverndarumsitingin fyrireikar at leggja málið fyri barnaverndarnevndina (og Høvuðsbarnaverndarnevndina) til støðutakan, grundað á úrslitið av kanningini. Um kanningin gevur grundarlag fyri at bráðfeingis umsorganaryvirtaka barnið, kann bráðfeingis avgerð takast eftir § 17. Eru treytirnar í § 17 ikki loknar, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.

***Viðv. § 1, nr. 41***
Krøv verða sett til, hvat kanningin skal fevna um. Kanningin skal taka støði í eini heildarmeting av støðuni og tørvinum hjá barninum og familjuni. Útgangsstøðið er, at kanningin skal fevna um øll 6 viðurskifti, ið eru nevnd í stk. 1.

Kanningin skal ikki gerast meira víðfevnd, enn neyðugt sbr. stk. 4 (nú stk. 5). Barnaverndarumsitingin skal tí í hvørjum einstøkum máli taka støðu til, um øll 6 viðurskiftini eru viðkomandi at kanna í mun til tað einstaka barnið. Støða skal takast til, um viðurskiftini skulu kannast, og í hvønn mun viðurskiftini skulu kannast, t.e. vavið av kanningini av teimum einstøku viðurskiftunum. Metir barnaverndarumsitingin, at eitt ella fleiri viðurskifti ikki eru viðkomandi at kanna, ella at viðurskifti eru, sum bert eru viðkomandi at kanna yvirskipað, skal barnaverndarumsitingin grundgeva fyri hesum.

Tey 6 viðurskiftini fevna um:

*Nr. 1) Menning og atferð*
Her verður kannað, hvør atferð hjá barninum tað er, ið hevur ført til stúranina, og nær henda atferðin vísir seg. Harafturat verður kannað, um barnið er aldurssvarandi ment. Barnsins styrkir og veikleikar skulu lýsast.

*Nr. 2) Familjuviðurskifti*
Her verða viðurskiftini viðvíkjandi familjuni og netverkinum/sosiala trygdarnetinum kannað. Í kanningini av hesum viðurskiftum eigur serligur dentur at verða lagdur á sambandi millum barnið, familjuna og sosiala trygdarnetið, og hvønn týdning hetta hevur fyri barnsins menning, trupulleikar og styrkir. Barnsins samband við systkin, møgulig foreldur, ið barnið ikki býr saman við, ommur og abbar ella onnur, eigur at vera tikið við.

Eisini gerandisdagurin hjá familjuni, arbeiðsstøðan, fíggjarligu viðurskiftini og teirra týdningur fyri barnsins møguleikar at royna seg og møguligur saknur eiga at kannast.

Harafturat eigur serliga at verða hugt eftir, um foreldrini evna at geva barninum ta umsorgan, barnið hevur tørv á. Um ikki, kann í hesum sambandi kannast, hvørjar orsøkirnar eru til foreldranna manglandi umsorganarevni, og hvørja orku foreldrini hava til at megna at koma úr hesum trupulleikum.

Foreldraførleikakanning kann tó ikki setast í verk uttan samtykki.

*Nr. 3) Skúlaviðurskifti*
Her verður kannað, hvussu tað gongur hjá barninum í skúlanum, bæði fakliga og sosialt, umframt um barnið hevur ov nógva fráveru.

Í sambandi við skúlaviðurskifti er umráðandi at hugsa um, hvørja ávirkan skúlaumhvørvið hevur á barnsins trupulleikar, eitt nú undirvísingarumhvørvið og vinarsambondini.

*Nr. 4) Heilsuviðurskifti*
Her verður kannað, um barnsins vøkstur og menning er aldurssvarandi, og um barnið hevur verið til tær vanligu læknakanningarnar og hevur fingið tær vanligu koppsetingarnar.

Tað kann eisini vera viðkomandi at kanna, um tekin eru um misbrúk, ovurviðkvæmi, astma, undir/yvirvekt ella aðrar trupulleikar. Alt eftir støðuni í tí ítøkiliga málinum kann vera viðkomandi at fáa læknakanningar alla aðrar kanningar gjørdar, sí § 18 og § 37.

*Nr. 5) Frítíðarviðurskifti og vinskapur*
Her verður kannað, hvussu barnsins aktuellu frítíðarviðurskifti og vinarsambond eru, eins og tað verður mett um, hvørjir framtíðarmøguleikar eru í hesum sambandi.
Havast skal í huga, at ein partur av hesi kanningini er tætt knýttur at barnsins skúlaviðurskiftum, her í millum í hvønn mun skúlaumhvørvið gevur møguleikar fyri, at barnið verður stuðlað í at menna vinskap.

Kanningin eigur at fevna um, hvørt barnið følir seg útihýstan, einsamalt ella vísir óhepna atferð í mun til vinirnar. Eisini eigur at verða hugt eftir, um gjørligt er at fáa eykahjálp í umhvørvinum, sum barnið ferðast í, sum kann hjálpa í mun til møguligar trupulleikar.

*Nr. 6) Onnur viðkomandi viðurskifti*
Ofta er neyðugt at fáa fleiri upplýsingar, enn tær frá nr. 1 – 5, vísandi til at øll viðkomandi viðurskifti skulu kannast/lýsast.

Júst hvørji viðurskifti talan kann vera um, veldst um tað einstaka málið. Talan kann t.d. vera um upplýsingar frá dagstovni ella dagrøkt. Eisini kann talan vera um serlig viðurskifti, ið gera seg galdandi í mun til børn, ið hava verið úti fyri harðskapi ella eru misbrúkt. Harafturat kann vera, at serlig atlit skulu takast til uppruna, mentan, átrúnað og mál.

***Viðv. § 1, nr. 42***
Barnaverndarumsitingin skal í kanningini lýsa styrkir og trupulleikar hjá barninum, familjuni og netverkinum/sosiala trygdarnetinum rundan um barnið. Við hesi lýsing er møguligt at meta um, hvørt tað við hjálp frá familjuni ella netverkinum er møguligt at loysa trupulleikarnar møguliga saman við eini fyribyrgjandi fyriskipan.

Í mun til størri børn er umráðandi, at atlit verða tikin til teirra sambond í nærumhvørvinum. Í mun til børn, ið hava fylt 16 ár, eiga serlig atlit at takast til teirra sambond í nærumhvørvinum, og tey serligu viðurskifti, ið eru viðvíkjandi hesum børnum í sambandi við val av fyriskipan, her í millum um talan skal vera um fyriskipan í heiminum, í nærumhvørvinum, ella uttan fyri nærumhvørvið. Tískil eiga hesi viðurskifti at verða lýst.

Tað kann vera trupult at fáa størri børn at støðast í eini fyriskipan í sambandi við umsorganaryvirtøku. Um barnið skal flyta millum fleiri fyriskipanir, kann hetta hava neiliga ávirkan á teirra skúlagongd og møguleika fyri varandi vinarsambondum, og tískil vera við til at gera trupulleikarnar størri. Tískil eiga atlit at verða tikin til hesi viðurskifti í sambandi við val av fyriskipan, samstundis sum atlit vera tikin til framtíðarútlitini hjá barninum at gerast sjálvbjargið. Fyri nøkur børn fer tað at verða best at verða verandi í nærumhvørvinum, meðan tað fyri onnur er best at fara burtur frá nærumhvørvinum.

Alt eftir støðuni í tí einstaka málinum, kann vera viðkomandi at kanna sambandið hjá barninum við nærumhvørvið, og hvørjir møguleikar eru í tí sambandi. Eisini kann vera viðkomandi at lýsa, um barnið er í einum vælvirkandi skúla- ella útbúgvingar(til)gongd, ið ikki eigur at verða avbrotið/slitið. Harafturat kann vera viðkomandi at kanna framtíðar útbúgvingar- ella arbeiðsumstøður, ið hava týdning fyri, hvar barnið skal hava bústað.

Ongar ásetingar eru um, nær ein nýggj kanning skal gerast. Um tað vísir seg, at tørvur er á fleiri ella nýggjari fyriskipan, ið ikki hava verið umhugsað fyrr, kann vera viðkomandi at gera nýggja kanning, ella møguliga at gera eina ískoytiskanning. Hetta kann vera viðkomandi, t.d. tá fyribyrgjandi fyriskipanir vísa seg ikki at hjálpa upp á trupulleikan, og tað tí gerst neyðugt við fyriskipan, ið ger størri inntriv í familjuna. Um ískoytiskanning verður gjørd, skal hon innihalda aktuellar upplýsingar um viðkomandi viðurskifti, her í millum viðurskiftini í familjuni síðan síðstu kanning, hvønn virknað tann fyriskipanin hevur havt, ið varð sett í verk, og hvørjir trupulleikar nú eru.

***Viðv. § 1, nr. 43***
Konsekvensbroyting.

***Viðv. § 1, nr. 44***
Ætlanin skal taka støði í kanningini eftir § 45. Tað er ikki eitt krav, at ætlanin skal fevna um øll 6 viðurskiftini, ið kanningin fevnir um, men ætlanin skal fevna um tey viðurskifti/teir trupulleikar, ið kanningin hevur víst, at barnið og foreldrini tørva hjálp til at koma burturúr. Ætlanin skal tryggja, at barnið og foreldrini fáa ta hjálp, sum kanningin sambært § 45 hevur víst, at tey hava tørv á.

Í ætlanini skal vera lýst, hvørjar hugleiðingar hava verið um, hvør fyriskipan skal setast í verk og ítøkilig mál í mun til barnsins trivnað og menning.

Ætlanin skal nágreiniliga lýsa endamálið við fyriskipanini. Eisini skal ætlanin lýsa, hvørji mál eru við fyriskipanini. Tað skal sostatt lýsast, hvørji mál eru í mun til tann tørv, ið kanningin hevur víst á. Harafturat skal lýsast, hvør fyriskipan skal setast í verk í mun til tann einstaka tørvin, og hvørjar hugleiðingar hava verið um, hvør fyriskipan er neyðug fyri at náa málinum.

Av ætlanini skal eisini koma fram, hvørji viðurskifti elva til hvørji mál, t.d. um tað eru viðurskifti hjá barninum, familjuni ella umhvørvinum.

Í mun til barn, ið verður sett heiman, skal ætlanin lýsa, hvørji viðurskifti hjá barninum, uppihaldið uttan fyri heimið, skal bøta um, eins og tað skal koma fram, um tað eru trupulleikar hjá barninum, viðurskifti hjá foreldrunum, ella sambandið við foreldrini, sum eru orsøkin til, at barnið skal setast heiman.

Barnið skal helst hava samband við ein ella fleiri vaksin. Tí er neyðugt at umhugsa, bæði hvørji sambond barnið hevur, hvussu hesi kunnu varðveitast, og hvørji nýggj sambond arbeiðast skal við at fáa barninum.

Tað skal koma fram í ætlanini fyri barnið, hvør fyriskipan verður sett í verk í mun til familjuna.

Bæði endamálið við eini fyriskipan, ið verður sett í verk, og málini skulu lýsast so ítøkiligt sum gjørligt, soleiðis at tað er møguligt at siga, nær endamálið og tey einstøku málini eru rokkin. Fyri at tað skal vera møguligt at eftirmeta fyriskipanina og fyri at tryggja, at øll – málsviðgeri, foreldur, barn, og tann, sum stendur fyri fyriskipanini – kunnu arbeiða fram ímóti einum felags máli.

Ætlanin skal tilskila, hvussu leingi fyriskipanin væntast at skula halda fram/vara. Hóast tað er trupult, má tað gerast ein ítøkilig meting av, hvussu langa tíð tað fer at taka at náa málinum. Hetta fyri at barnið og foreldrini hava ein varhuga av longdini av fyriskipanini.

Tað er barnaverndarumsitingin, ið hevur ábyrgd av at gera ætlanina eftir § 47. Tann, ið varðar av tí fyriskipan, ið verður sett í verk, skal gera eina virkisætlan í samstarvi við barnaverndarumsitingina og aðrar viðkomandi partar. Virkisætlanin skal gerast við grundarlagi í ætlanini eftir § 47.

Ætlanin eftir § 47 kann broytast, um eftirmetingin sambært § 16 vísir, at ætlanin eigur at broytast. Sí viðmerkingarnar viðv. § 1, nr. 21.

Ein sjálvstøðug ætlan skal gerast fyri foreldrini, meðan barnið er sett heiman. Krøvini til innihaldið í ætlanini fyri foreldrini eru tey somu sum í stk. 2. Tað skal vera heilt greitt fyri foreldrini, hvat tey skulu ella kunnu gera, fyri at barnið kann koma heim aftur. Í ætlanini skal tískil klárt verða lýst, hvat endamálið er við fyriskipanini, málið við fyriskipanini, hvussu leingi fyriskipanin varar, v.m.

Ætlanin fyri foreldrini skal, eins og fyri barnið, taka støði í kanningini eftir § 45, og fyriskipan skal setast í verk í mun til tann tørv, ið kanningin hevur lýst.

Tá eitt barn verður sett heiman, er útgangsstøðið, at barnið skal heim aftur. Tískil er umráðandi at arbeiða við familjuni í mun til hetta. Júst hvør fyriskipan eigur at setast í verk, má metast um við støði í kanningini eftir § 45. Yvirordnað kann tó sigast, at tað, sum eyðkennir fyriskipanirnar, er, at tær antin eru ætlaðar at loysa trupulleikar hjá foreldrunum, ella ætlaðar at fyrireika familjuna til, at barnið kemur heim aftur. Er orsøkin, til at barnið er sett heiman, trupulleikar hjá foreldrunum, eitt nú vansorgan, eigur ein fyriskipan at setast í verk til at loysa hendan

trupulleikan. Er orsøkin hinvegin trupulleikar hjá barninum sjálvum, eigur ein fyriskipan at setast í verk fyri familjuna, ið kann fyrireika familjuna til, at barnið kemur heim aftur.

Ein felags ætlan kann gerast fyri børnini í familjuni – sí viðmerkingarnar til stk. 5.

***Viðv. § 1, nr. 45***
Er talan um barn, ið hevur fylt 16 ár, skal ætlanin, umframt tað, sum er ásett í stk. 2, eisini innihalda ítøkilig mál í mun til skiftið til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Endamálið er at fyrireika barnið best møguligt til eitt lív sum vaksið. Í mun til at seta ítøkilig mál, skal eisini lýsast, hvørjar hugleiðingar hava verið um, hvørja tilgongd barnið eigur at hava, áðrenn og aftaná tað fyllir 18 ár. Í hesum sambandi kann vera viðkomandi at leggja dent á útbúgving, framtíðar arbeiðsmøguleikar, húslig og fíggjarlig viðurskifti – førleikar, ið gera tað møguligt hjá barninum at gerast sjálvbjargið.

Ætlanin skal sostatt eisini lýsa, um barnið væntast at hava tørv á eini fyriskipan, eftir at tað hevur fylt 18 ár, og um so er, hvørja fyriskipan talan er um.

Skal fyriskipan setast í verk, tá barnið gerst 18 ár, sbr. § 15 b, skal ein ætlan gerast í mun til hesa fyriskipan, 6 mánaðir áðrenn barnið fyllir 18 ár.

Tað kann gerast ein felags ætlan fyri fleiri børn í eini familju. Ætlanin skal tó taka hædd fyri, at børnini eru ymisk, og skal innihalda mál fyri tað einstaka barnið, við støði í kanningini eftir § 45.

Møguligt er tó at gera sjálvstøðuga ætlan fyri tað einstaka barnið í familjuni.

Í málum, har atlitið til barnið ger, at avgerð um at seta fyriskipan í verk ikki kann bíða eftir, at ein ætlan er gjørd, er nóg mikið við eini stuttari tilskilan av endamálinum við fyriskipanini. Í slíkum málum er sostatt ikki krav um, at ein fullfíggjað ætlan fyriliggur, áðrenn avgerð verður tikin. Barnaverndarumsitingin hevur tó skyldu til at gera eina ætlan, ið lýkur krøvini í § 47, stk. 2 – 5, skjótast gjørligt og í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at barnaverndarnevndin hevur tikið avgerð um at seta fyriskipan í verk.

***Viðv. § 1, nr. 46***
§ 55, stk. 2 fevnir um eftirmeting av fyriskipan um umsorganaryvirtøku eftir § 19, sambært § 20, § 24, tó ikki § 24 d, stk. 2, og bráðfeingisavgerðir eftir § 17.

Í málum um eftirmeting av fyriskipan um umsorganaryvirtøku eftir § 19 skal fundurin haldast í seinasta lagi ein mánað eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur móttikið málið. Skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini hevur sostatt í slíkum málum upp til ein mánað at kanna eftir, at málið er nóg væl upplýst, áðrenn tað verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Hetta hevur við sær, at barnaverndarnevndin í slíkum málum skal senda tilmælið við øllum skjølum og upplýsingum, sum ásett í § 52, stk. 4, til Høvuðsbarnaverndarnevndina í seinasta lagi ein mánað áðrenn freistina, ið er ásett sambært § 24 a, stk. 1, 2, 4 ella 5.

Í mun til avgerð eftir § 17 er freistin sambært § 55, stk. 2 ein mánaður. Hevur barnaverndarnevndin tikið bráðfeingis avgerð eftir § 17, skal barnaverndarnevndin senda málið til Høvuðsbarnaverndarnevndina í seinasta lagi ein mánað, áðrenn avgerðin hjá

barnaverndarnevndini gongur út, um barnaverndarnevndin ynskir, at umsorganaryvirtøka skal halda fram eftir § 19. Viðmerkjast skal, at § 17, stk. 3 samstundis verður broytt soleiðis, at avgerðin hjá barnaverndarnevndini kann standa við í upp til fýra mánaðir. Sostatt hevur barnaverndarnevndin framvegis upp til tríggjar mánaðir at kanna málið, áðrenn tað skal sendast Høvuðsbarnaverndarnevndini. Málið skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, uttan mun til um barnaverndarnevndin mælir til at umsorganaryvirtaka barnið eftir § 19, ella mælir til at seta barnið heim aftur.

Freistin í § 55, stk. 2 er eisini galdandi í mun til avgerð, ið barnaverndarnevndin hevur tikið eftir § 20. Barnaverndarnevndin skal sostatt senda málið til Høvuðsbarnaverndarnevndina í seinasta lagi ein mánað, áðrenn avgerðin hjá barnaverndarnevndini gongur út. Hetta hevur við sær, at barnaverndarnevndin bert hevur tveir mánaðir at fyrireika málið, áðrenn tað skal sendast Høvuðsbarnaverndarnevndini. Talan er upprunaliga um eina umsorganaryvirtøku eftir § 19. Tískil eigur málið longu at vera væl upplýst – kanningin eftir § 45 er gjørd og eftirmeting gjørd eftir § 24, stk. 1 og § 16, um umsorganaryvirtøkan hevur vart eina tíð. Tørvur eigur sostatt ikki at vera á at fáa nógv fleiri upplýsingar til vega. Grundað á, at talan upprunaliga er um umsorganaryvirtøku eftir § 19, skal eftirmeting leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina sambært § 24 – 24 e, uttan mun til um barnaverndarnevndin mælir til, at umsorganaryvirtøka skal halda fram uttan samtykki, ella mælir til at seta barnið heim aftur.

Í mun til, um avgerðirnar eru eftir §§ 17, 18 og 20, skulu hesar framvegis sendast Høvuðsbarnaverndarnevndini til góðkenningar, sum ásett í stk. 3 í ávikavist §§ 17, 18 og 20.

***Viðv. § 1, nr. 47***
Fosturforeldur skulu, sambært § 24, stk. 5 (nú § 24 c, stk. 2), altíð hoyrast, áðrenn nýggj avgerð viðvíkjandi umsorganaryvirtøku verður tikin. Við broytingini í § 55, stk. 3 nú 4 skulu fosturforeldur altíð kallast inn til samráðingarfundin í Høvuðsbarnaverndarnevndini, tá talan er um eftirmeting av fyriskipan um umsorganaryvirtøku, og hava høvi til at siga sína hugsan.

***Viðv. § 1, nr. 48***
Yvirskrift verður sett inn, ið vísir, at § 62 inniheldur ásetingar um, hvussu farast skal fram, tá tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, flyta uttanlands.

***Viðv. § 1, nr. 49***
Eingin innihaldslig broyting í greinini. Tað verður bert greitt orðað, at Barnaverndarstovan bert kann taka avgerð í málum, har ósemja er millum føroyskar barnaverndarnevndir um, hvør barnaverndarnevnd eigur málið.

Barnaverndarstovan hevur ikki heimild til at taka avgerð í málum, har ósemja er millum føroyska barnaverndarnevnd og útlendskan myndugleika um, hvør teirra eigur málið. Avgerðarmyndugleikin í slíkum málum verður ásettur í kunngerð við heimild í § 79 í barnaverndarlógini.

***Viðv. § 1, nr. 50***
Konsekvensbroyting í mun til, at barnaverndarnevndin ikki hevur rætt til at leggja avgerðir hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini fyri Føroya Rætt sambært § 468 a, stk. 3 í rættargangslógini

(bekendtgørelse nr. 148 fra 9. marts 2004 af lov for Færøerne om rettens pleje, som senest ændret ved lov nr. 414 af 9. maj 2011).

***Viðv. § 1, nr. 51***

Ásetingin verður broytt soleiðis, at Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki longur skal áleggja foreldrum at rinda eitt uppalingarískoyti, meðan barnið er sett heiman.

Í staðin verða reglurnar í lógini um rættarstøðu barnanna brúktar (lov nr. 200 af 18. maj 1960 om børns retsstilling, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010).

Tað almenna hevur rætt til at fáa barnagjald og onnur gjøld frá tí, sum er álagdur at rinda barnagjald og onnur gjøld eftir lógini um rættarstøðu barnanna. Eru bæði foreldrini áløgd at rinda barnagjald og onnur gjøld, hevur tað almenna rætt til gjøldini frá báðum.

Harafturat hevur tað almenna rætt til at fáa ásett barnagjald hækkað. Er einki barnagjald ásett, kann tað almenna krevja, at tey, ið hava uppihaldsskyldu mótvegis barninum, verða áløgd at rinda barnagjald og onnur gjøld eftir lógini um rættarstøðu barnanna. Tað almenna kann skúgva til viks eina avtalu, sum tey, ið hava uppihaldsskyldu mótvegis einum barni, hava gjørt um barnagjald og onnur gjøld.

Tað almenna er at skilja sum tann myndugleiki, ið uppiheldur barninum, meðan tað er sett heiman, t.e. rindar útreiðslurnar fyri barnsins uppihald. Verður barnið sett til fosturs, er "tað almenna" at skilja sum tann barnaverndartænasta, ið rindar útreiðslurnar í hesum sambandi. Verður barnið sett á stovn, er "tað almenna" at skilja sum landið.

Tað er Ríkisumboðið, sum eftir áheitan tekur avgerð um at áseta og broyta barnagjald og onnur gjøld eftir lógini um rættarstøðu barnanna. Tað almenna má sostatt senda eina áheitan til Ríkisumboðið, um at fáa barnagjald og onnur gjøld ásett ella fáa eina gjaldsavgerð broytta.

Tað er eisini tann myndugleiki, ið uppiheldur barninum, sum hevur rætt til at innheinta peningin, um gjaldskyldugi – tann, ið av Ríkisumboðnum er álagdur at gjalda – ikki rindar. Innheintan fer fram eftir reglunum í lov nr. 150 af 24. april 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag, som ændret ved lov af 280 af 8. juni 1977 (innheintingarlógin). Sambært § 2 í innheintingarlógini, er tað Almannastovan, sum eftir áheitan innheintar peningin. Sostatt skal tann myndugleiki, ið hevur rætt til gjaldið, senda áheitan til Almannastovuna um at innheinta peningin, um gjaldskyldugi ikki rindar til tíðina.

Tann, ið av Ríkisumboðnum verður álagdur at rinda barnagjald ella onnur gjøld eftir lógini um rættarstøðu barnanna, hevur rætt til stuðul til uppihaldspening eftir lógini um stuðul til uppihaldspening (løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 28. desember 2010), um treytirnar annars eru loknar. Hetta er eisini galdandi, tá gjald verður álagt orsakað av, at barnið er sett heiman. Eftir galdandi siðvenju kunnar Ríkisumboðið tann, ið verður álagdur at rinda barnagjald, um møguleikan fyri at fáa stuðul til uppihaldspening.

***Viðv. § 1, nr. 52***

Einasta broyting er, at uppalingarískoyti ikki kann áleggjast einum barnið, fyrr enn tað hevur fylt 18 ár.

*Viðv. § 2, stk. 1*
Gildiskomuregla.

*Viðv. § 2, stk. 2*
Hóast lógin kemur í gildi 1. juli 2012, skulu krøvini í § 1, nr. 3 – 5 ikki vera lokin fyrr enn frá tí, at barnaverndarnevnd fyrstu ferð skal veljast, eftir at lógin er komin í gildi.

§ 1, nr. 6, 1. pkt. hevur onga ávirkan fyri tey starvsfólk, ið longu eru sett í barnaverndarumsitingini, men hevur virknað fyri starvsfólk, ið verða sett eftir, at lógin er komin í gildi.

**Fylgiskjøl:**

**Skjal 1 – Paralelltekstur – Samanhalda galdandi lóg við lógartekst í uppskotinum**
**Skjal 2 – Fíggjarmálaráðið, dagf. 1. Febr. 2012**
**Skjal 3 – Almannastovan, dagf. 8. Febr. 2012**
**Skjal 4 – Barnaverndarstova Føroya, dagf. 7. Febr. 2012**
**Skjal 5 – Føroya Kommunufelag, dagf. 10. Febr. 2012**
**Skjal 6 – Forsturforeldrafelagið, dagf. 7. Febr. 2012**
**Skjal 7 – Høvuðsbarnaverndarnevndin, dagf. 10. Febr. 2012**
**Skjal 8 – Innlendismálaráðið, dagf. 10. Febr. 2012**
**Skjal 9 – Kommunuskipan Føroya, dagf. 10. Febr. 2012**
**Skjal 10 – Føroya Lærarafelag, dagf. 7. Febr. 2012**
**Skjal 11 – Mentamálaráðið, dagf. 7. Febr. 2012**
**Skjal 12 – Nærverkið, dagf. 8. Febr. 2012**
**Skjal 13 – Ankestyrelsen, dagf. 7. Febr. 2012**
**Skjal 14 – Føroyskir Sálarfrøðingar, dagf. 8. Febr. 2012**
**Skjal 15 – Prestafelag Føroya, dagf. 8. Febr. 2012**

Almannamálaráðið, 29. februar 2012

Annika Olsen
landsstýriskvinna

/

Eyðun Mohr Hansen